# Inntøkustøðið í Føroyum

## Hví eru vit so rík, men ikki líka rík sum hini?



# Innihaldsyvirlit

**Hví eitt tema um inntøkustøði í Føroyum?** 3
*Privatbúskaparlig atlit stýra atferðini* 3
*Hagfrøðilig prógv* 3
**Hvat er tað, vit royna at skilja?** 4
Hvat er búskaparvøkstur? 4
*Ikki konjuktursveiggj…* 4
*…men produktivitetsvøkstur* 4
*Nøkur dømi* 4
Búskaparvøksturin í Føroyum 5
Inntøkustøði 6
Gott og ringt 8
**Hvar finst ein frágreiðing?** 9
Niðurstøður frá vakstrarteori 9
*Kapitalapparat, útbúgving og framleiðslutøkni* 9
*Gransking og herming* 9
*Bygnaðarlig viðurskifti* 9
Ein spurningur um politikk 10
**Bygnaðarlig viðurskifti** 11
Hvat eru “bygnaðarlig viðurskifti”? 11
Marknaðir og vinnuligar leikreglur 12
*Vinnuligi marknaðurin* 13
*Vinnupolitiski marknaðurin* 13
*Samband millum marknaðirnar* 14
Hvar koma vinnuligu leikreglurnar frá? 15
**Góðar bygnaðarligar skipanir** 16
Skipað margfaldni 16
*Skipað kapping* 16
*…Í vælvirkandi sosialum undirstøðukervi* 16
Týdningarmiklar skipanir 17
*Ognarrættindi* 17
*Vinnuligar leikreglur og eftirlit* 17
*Undirstøðukervi* 18
*Viðger av trætum* 19
*Sosialar tryggingar* 19
*Makrobúskaparlig stabilisering* 19
Politiskt ábyrgdarøki 20
**Hvat loyvir vánaligum leikreglum?** 21
Almennar uppfatanir 21
Eginleikin at týða búskaparliga umhvørvið 21
Sosialur kapitalur 22
Søguligur bundinskapur 22
State capture 23
**Er samband millum náttúruríkidømi og state capture?** 24
Ein signing 24

…ella hvat? 24
Hálendsk sjúka 24
Dansur um gullkálvin 25
Virðismeting av náttúruríkidømi 26

**Hví eru vit so rík í Føroyum? 27**
Innflutt tøkni… 27
…og samfelagsligt undirstøðukervi 28
Førleiki at læra 29

**Hví eru vit ikki líka rík sum hini? 30**
Løtt atgongd til vinnupolitiskan marknað 30
"Í samráð við vinnuna" 30
Ressource curse 31
*Statistiska illusjónin… 31*
*…gevur pláss fyri politiskari ávirkan… 33*
*…hjá áhugabólkum við nógvum sosialum kapitali 33*
Søguligur bundinskapur í fiskiskapi og aling 34
State Capture í tilfeingisvinnunum 34
Tilfeingisvinnurnar sum arbeiðsskapandi tiltøk 36
*Vaksandi trupulleiki 36*
*Vend má koma í 37*
Almennur partapeningur 37
Skeiv regulering í heimamarknaðarvinnum 38
Er tað verri enn í øðrum londum? 38
Lágur produktivitetur 39
*Útbúgvingarstøði 39*
*Kapitalapparat 39*
*Tøkni og produktivitetur 40*

**Hvat kann gerast betri? 41**
Politiskur førleiki 41
Almenna uppgávan 43
Vælvirkandi vinnuligir marknaðir 44
*Útflutningsvinnur 44*
*Heimamarknaðarvinnur 45*
Privatiseringar 45

**Litteraturlisti 47**

# Hví eitt tema um inntøkustøði í Føroyum?

Tað er trupult at yvirmeta týdningin av búskaparvøkstri. Inntøkustøðið og harvið materiella livistøðið í einum samfelag verður í mestan mun avgjørt av tí búskaparvøkstri, sum hevur verið nógvu árini frammanundan.

Vælferðin hjá borgarunum í einum landi er í stóran mun tengd at inntøkustøðinum, t.e. samlaðu virðisskapanini eitt ávíst tíðarskeið. Búskaparliga virðisskapanin ger av inntøkustøðið og harvið eisini nøgdina og góðskuna av vørum og tænastum, ið eru til taks hjá landsins borgarum.

Eitt høgt inntøkustøðið er eingin sjálvfylgja. Ógvuliga ymiskt er, hvussu inntøkustøðið er í heimsins londum. Nøkur lond eru sera rík, og onnur eru sera fátøk. Í nøkrum londum hækkar inntøkustøðið skjótt, og í øðrum londum hækkar tað seint ella beinleiðis lækkar.

Gongdin í inntøkustøðinum í einum landi er ikki náttúrugivin. Eitt land kann hava stóran búskaparvøkstur nøkur tíðarskeið og lítlan búskaparvøkstur onnur tíðarskeið, uttan at náttúruviðurskifti kunnu leggjast til grund fyri broytingini í vøkstrinum. Lond, sum hava eins náttúrugivnar fortreytir, hava ofta sera ymisk inntøkustøði. Norður- og Suðurkorea og Eystur- og Vesturtýskland eru kanska kendastu dømini. Nøkur lítil lond eru rík, meðan onnur lítil lond eru fátøk. Nøkur lond við stórum náttúruríkidømi eru rík, meðan onnur lond, ið eisini hava stórt náttúruríkidømi, eru fátøk.

Búskaparráðið hevur tí valt hesuferð at gera eina greining av grundarlagnum undir inntøkustøðinum í Føroyum. Hví eru vit so rík í Føroyum, men ikki líka rík sum ríkastu lond í heiminum? Hvat gera vit rætt og hvat kunnu vit gera betur?

Í hesum sambandi er neyðugt at greiða frá tveimum grundleggjandi fyritreytum fyri greiningunum.

## *Privatbúskaparlig atlit stýra atferðini*

Nøkur vilja vera við, at munurin í inntøkustøði millum lond skyldast munum í ”hugburði”, til dømis orsakað av munum í átrúnaði, mentannararvi ella líknandi. Eingin ivi er um, at nógv ymisk viðurskifti kunnu gera, at fólk ikki bara hugsa um at fáa mest fyri minst í ymsum førum. Men útgangsstøðið í hesi frágreiðingini er, at tá umræður týðandi fíggjarligar og búskaparligar avgerðir, sum tær, ið verða viðgjørdar í hesi frágreiðing, so handla fólk eftir, hvat gevur teimum størst privatbúskaparligan vinning.

## *Hagfrøðilig prógv*

Nakrar av niðurstøðunum í hesi frágreiðingini kunnu hvørki prógvast ella avsannast við hagfrøðiligum tilfari. Í fyrra lagi skyldast hetta, at granskingin á økinum er farin nýggjar leiðir seinastu árini, og tað ger, at hagfrøðiliga tilfari, sum skal brúkast til at eftirmeta nýggjastu ástøðini ofta ikki er tøkt enn. Í øðrum lagi skyldast manglandi hagfrøðiligu prógvini, at tað ofta er trupult at seta tøl á kvalitativu viðurskiftini, sum nýggjasta granskingin viðger. Til dømis er tað trupult at seta tal á, kanska á einum skala frá eitt til fimm, hvussu demokratisk ella diktatorisk ymsu londini í heiminum eru.

Tá tað kemur til nýggjastu ástøðini má tí ofta grundgevast fyri niðurstøðunum við eini blanding av nýggjari og eldri søguligum dømum, og búskaparfrøðiligari teori. Tað er sjálvsagt ein veikleiki, at tað ikki ber til at undirbyggja niðurstøðurnar við meira haldfastum hagfrøðiligum prógvum. Men páhaldið í hesi frágreiðingini er, at hóast hetta ber til at læra nakað um búskaparvøkstur og munir í inntøkustøði millum lond við búskaparfrøðiligum greiningum.

# Hvat er tað, vit royna at skilja?

## Hvat er búskaparvøkstur?

### *Ikki konjuktursveiggj…*

Konjuktursveiggj eru sveiggj í samlaðu virðisskapanini, tað vil siga í inntøkustøðinum, og tey kunnu merkjast týðiliga yvir styttri áramál. Til dømis kunnu sveiggj í fiskiskapi og fiskaprísum gera mun frá einum ári til tað næsta. Fiskaloysi ella vánaligir fiskaprísir kunnu gera, at bruttotjóðarúrtøkan, t.e. netto virðisskapanin, eitt ár er nøkur prosent minni, enn hon annars hevði verið.

Men tað eru ikki skiftandi gongdin í fiskiskapi ella fiskaprísum, sum hevur viðført, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan per íbúgva er fleiri ferðir størri í dag enn fyri 100 árum síðan. Sveiggj í inntøkuskapanini orsakað av sveiggjum í fiskiskapi ella fiskaprísum eru ikki varandi, tí tey skyldast tíðaravmarkaðum broytingum í samlaðum útboði ella eftirspurningi. Av somu orsøk hava tey ikki varandi ávirkan á samlaða búskaparligu virðisskapanina.

### *…men produktivitetsvøkstur*

Grundleggjandi vælferðarstøði og framhaldandi hækking av hesum verða tryggjað av høgum og hækkandi produktiviteti í framleiðslu av vørum og tænastum. Tað er samlaður produktivitetsvøkstur gjøgnum nógv ár, sum avgerð inntøkustøðið, ikki góður ella ringur fiskiskapur, slakur ella táttandi fíggjarpolitikkur ella líknandi. Hevði produktivitetsvøksturin verið minni, var føroyska bruttotjóðarúrtøkan minni enn tær umleið 10 milliardir krónurnar, sum BTÚ var í 2000, og hevði produktivitetsvøksturin verið størri, var BTÚ størri.

Í hesi frágreiðingini <u>definera</u> vit tí búskaparvøkstur sum haldgóður produktivitetsvøkstur per íbúgva, t.e. sum haldgóður vøkstur í framleiðslumøguleikum per íbúgva. Tað vil siga at vit síggja burtur frá stutttíðarsveiggjum í virðisskapanini í hesi frágreiðingini og fokusera upp á tey viðurskifti, sum hava varandi týdning fyri inntøkustøðið.

### *Nøkur dømi*

Fyri at gera skilnaðin millum produktivitetsvøkstur og aðrar ávirkanir á inntøkuskapanina greiðari, kunnu vit nevna nøkur dømi um, hvat produktivitetsvøkstur er.

- Hvør fiskimaður undir Føroyum fiskar nógvar ferðir størri nøgd av fiski í dag enn fyri 50 árum síðan. Fleiri fiskimenn í sær sjálvum gevur ikki hægri búskaparvøkstur, heldur tvørturímóti. Búskaparvøkstur stendst av at framleiðslan hjá hvørjum einstøkum fiskimanni varandi verður meira effektiv.
- Hvør lossingarmaður arbeiðir nógv størri nøgd av farmi um dagin í dag enn fyri 50 árum síðan.
- Góðskan á læknaviðgerð í dag er nógvar ferðir betri enn fyri 50 árum síðan, og tí framleiðir ein lækni nógvar ferðir størri virði um tíman í dag enn fyri 50 árum síðan.

Dømi um hvat produktivitetsvøkstur <u>ikki</u> er, eru:

- Broyting í ríkisveiting. Ríkisveitingin er ein gjaldoyragáva úr Danmark. Frá føroyskum sjónarmiði er hon arbeiðsfrí inntøka. Støddin á ríkisveitingini verður avgjørd í politiskum

samráðingum millum danskar og føroyskar myndugleikar og hevur tí einki við virðisskapanina í føroyska búskapinum sum so at gera.

- Broyting í býtislutfallinum. Um vit fáa meira fyri tær vørur og tænastur, ið vit selja til útheimin, ella tær vørur og tænastur vit keypa uttanífrá verða bíligari, batnar býtislutfallið og tað viðførir hægri inntøkustøði. Men broytingar í býtislutfallinum skyldast ikki at føroyska arbeiðsmegin er vorðin meira ella minni produktiv.
- Broyting í kapacitetsnýtsluni. Í einum lágkonjukturi verða nakrir framleiðslumiðlar, til dømis virkisbygningar og arbeiðsmegi, ikki brúktir. Samlaða virðisskapanin er tí minni, enn hon hevði verið, um allir framleiðslumiðlar vórðu brúktir. Í einum hákonjukturi er kapacitetsnýtslan hægri enn vanligt, til dømis við at nógv fólk arbeiða meira yvirtíðararbeiði enn vanligt. Men sveiggj í kapacitetsnýtsluni er tíðaravmarkað. Um til dømis stórur eftirspurningur er eftir framleiðslumiðlum so sum virkisbygningum og arbeiðsmegi eitt tíðarskeið, so fer prísurin á teimum upp, og tá fellur eftirspurningurin aftur.

## Búskaparvøksturin í Føroyum




*Kelda: Hagstova Føroya. Tølini eru roknað sum BTÚ í leypandi prísum, deflaterað við brúkaraprístalinum.*

Á myndini omanfyri sæst, at framleiðsluvirðið per íbúgva í Føroyum er meira enn tvífaldað frá 1962 til 2002, úr umleið 70 túsund krónum í 1966 til umleið 211 túsund krónur í 2002, uppgjørt í 2002 krónum. Hetta svarar til meðal árligan vøkstur upp á 2,7 prosent fyri alt tíðarskeiðið. Hetta er ein vøkstur eitt sindur yvir vøksturin, sum hevur verið í øðrum europeiskum londum. Til dømis var meðal vøksturin í Frankaríki 2,3 prosent og í Bretlandi 1,9 prosent árliga frá 1960 til 1997. Til

samanberingar kann nevnast, at “Asiatisku tigararnir”, t.e. Hong Kong, Singapore, Taiwan og Suðurkorea, sama tíðarskeið høvdu ein meðal árligan vøkstur upp á meira enn 5 prosent. Av hesi orsøk hava hesi londini einans tikið umleið 12 ár at tvífalda inntøkustøðið, meðan tað hjá Føroyum og londum við sama vøkstri hevur tikið gott 30 ár at gera tað sama.

**Hvussu máta vit búskaparvøkstur?**

Fyri at fáa yvirlit yvir, hvussu stór búskaparlig virðir eitt land framleiðir eitt tíðarskeið, verður roknað eitt samanfatandi mát, sum er lætt at fáa yvirlit yvir, og sum kann samanlíknast tvørtur um landamørk. Í tjóðarroknskapinum stendur ikki, at føroyingar framleiddu so nógv tíðindabløð, so nógv barnagarðspláss, so nógv tons av aldum laksi osfr., tí ógjørligt hevði verið at fingið eitt brúkiligt yvirlit yvir samlaðu framleiðsluna. Øll framleiðsla í landinum verður tí umroknað til somu eind. Tá ein tjóðarroknskapur verður gjørdur, verður øll framleiðslu tí roknað um til krónur.

Men ein króna í 2000 er ikki tað sama sum ein króna í 1990. Fyri at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu støddin á framleiðsluni broytist yvir tíð er tí neyðugt at brúka somu eind ár um ár. Ein tjóðarroknskapur í føstum krónum telur upp, hvussu nógvar “1990 krónur” føroyingar framleiddu í 1990, hvussu nógvar “1990 krónur” føroyingar framleiddu í 1991, 1992 osfr.

Tað vil siga, at hugt verður ikki eftir, hvussu samansetingin av framleiðsluni er upp á faktiskar vørur og tænastur. Hugt verður bara eftir, hvat virðið er í føstum prísum. Vit kunnu siga, at samlaða framleiðslan í landinum verður tald upp í “eindum av BTÚ”.

Produktivitetsvøkstur er so, at ein arbeiðstími varandi gevur fleiri “eindir av BTÚ” enn áður. Búskaparvøksturin millum 2000 og 2001 verður so roknaður sum prosentvísa økingin í framleiðsluni av “eindum av BTÚ” frá 2000 til 2001.

Legg til merkis, at um ein “eind av BTÚ” í tjóðarroknskapinum er framleidd á einum bilverkstaði, á einum flakavirki ella á eini teldufyritøku er líka mikið. Hetta er ikki tilvild. Í hesum liggur ein staðfesting av tí búskaparliga veruleika, at ein króna í virðisøking skapt á einum flakatrolara er hvørki meira ella minni verd enn ein króna í virðisøking skapt á einum bilverkstaði.

Fyri at fáa eitt mát, sum samsvarar mest møguligt við hugtakið, vit hava definerað, tað vil siga eitt mát har broytingar í mest møguligan mun standast av produktivitetsbroytingum heldur enn stutttíðarsveiggjum, verður búskaparvøkstur vanliga máldur yvir eitt longri tíðarskeið, til dømis sum miðal vøksturin í eitt 30 ella 40 ára skeið. Á henda hátt verða stutttíðarsveiggj í virðisskapanini sáldað burturúr.

## Inntøkustøði

Hóast framleiðslan per íbúgva í Føroyum er vaksin nógv seinastu fjøruti árini, so eru vit ikki komin upp á sama inntøkustøði sum londini rundan um okkum. Myndin niðanfyri vísir lutfallið millum BTÚ per íbúgva í Danmark og Føroyum fyri tíðarskeiðið 1966-2002. Hon vísir, at frá 1966 til umleið 1975 var føroyska bruttotjóðarúrtøkan per íbúgva umleið 65 prosent av tí donsku. Frá 1975 til 1988 minkaði munurin støðugt, inntil at føroyska BTÚ per íbúgva í 1988 var 95 prosent av tí danska. Undir kreppuni minkaði lutfallið aftur niður til støðið í 1966, nevniliga umleið 65 prosent. Seinastu árini er lutfallið aftur hækkað, soleiðis at tað í 2002 var 83,5%. Tað vil siga at upp á 40 ár hava vit minkað um munin millum inntøkustøðið í Føroyum og Danmark niður í umleið eina helvt.

Greiða niðurstøðan burtur úr hesi myndini er, at framleiðslan per íbúgva í Føroyum er væl lægri enn í Danmark. Sjálvt tá búskapurin arbeiddi við fullari skrúvu og væl tað í 1980unum, samstundis sum

danski búskapurin ikki var væl fyri, var framleiðslan per íbúgva ikki á hædd við tí donsku. Endamálið við hesi frágreiðingini er at geva eitt boð upp á, hvørji viðurskifti liggja til grund fyri tí veruleika, sum myndin niðanfyri vísir.




*Kelda: Hagstova Føroya..*

Úrslitið av gongdini seinastu 40 árini er, at hóast vit hava havt búskaparvøkstur, so eru vit framvegis fátækari enn nærmastu grannarnir, og liggja niðarlaga í eini samanbering av inntøkustøðinum við tey ríkastu londini í heiminum. Talvan niðanfyri vísir inntøkustøðið per íbúgva í útvaldum londum í 2002. Í talvuni sæst, at inntøkustøðið per íbúgva í Føroyum er eitt sindur hægri enn í Grikkalandi og Portugal, og á leið tað sama sum í Spania og Italia. Men vit eru fátækari enn hini Norðurlondini, og inntøkustøðið í Føroyum er bara tveir triðingar av inntøkustøðinum í USA.

Serliga er vert at leggja merki til at vit eru væl minni produktiv enn íslendingar. Ísland er tað samfelag í heiminum, sum kanska líkist tí føroyska mest. Tí er høgi produktiviteturin í Íslandi ein ábending um, at møguleikar eru fyri at økja um framleiðsluvirðið per íbúgva í Føroyum, eisini samanborið við onnur lond, soleiðis at vit koma nærri teim ríkastu londunum í heiminum í inntøkustøði.

### Inntøkustøðið í útvaldum londum

BTÚ per íbúgva, 2002

| | PPP, US dollars | Prosent av USA |
|---|---|---|
| Luksemburg | 49400 | 136 |
| USA | 36200 | 100 |
| Noreg | 35500 | 98 |
| Írland | 32600 | 90 |
| Sveits | 30500 | 84 |
| Canada | 30300 | 84 |
| Danmark | 29200 | 81 |
| Holland | 29000 | 80 |
| Eysturríki | 28900 | 80 |
| Ísland | 28400 | 78 |
| Australia | 28100 | 78 |
| Bretland | 28000 | 77 |
| Belgia | 27700 | 77 |
| Frankaríki | 27300 | 75 |
| Svøríki | 27300 | 75 |
| Japan | 26900 | 74 |
| Finnland | 26500 | 73 |
| Týskland | 25900 | 72 |
| Italia | 25600 | 71 |
| **Føroyar** | **24400** | **67** |
| New Zealand | 22400 | 62 |
| Spania | 22400 | 62 |
| Portugal | 18400 | 51 |
| Grikkaland | 18400 | 51 |

*Keldur: OECD og Hagstova Føroya. Talið fyri Føroyar skal takast við fyrivarni. Fyri at kunna rokna talið fyri Føroyar er sett sum fyritreyt at ein króna í Føroyum hevur somu keypiorku sum ein króna í Danmark. Í tann mun ein króna hevur minni keypiorku í Føroyum enn í Danmark, er talið fyri Føroyar í talvuni tilsvarandi ov stórt.*

## Gott og ringt

Samanumtikið kann sigast, at eingin ivi er um, at í altjóða samanhangi er Føroyar eitt ríkt land og eitt vælferðarsamfelag. Men samstundis er heldur eingin ivi um, at vit eru væl fátækari enn ríkastu lond í heiminum. Serliga áhugavert er, at framleiðsluvirðið per íbúgva í Føroyum og tí eisini inntøkustøðið, er væl lægri enn í grannalondunum. Hvat er tað, sum ger, at vit eru so rík, og tó ikki líka rík sum hini?

# Hvar finst ein frágreiðing?

Fyrsta stig á leiðini at fáa betur innlit í, hví vit hava tað livistøðið vit hava í dag, er at finna fram til eina skilagóða niðurstøðu um, hvaðan búskaparvøkstur í heila tikið kemur frá. Fyri ikki at troytta lesaran við ov nógvum ástøðiligum útgreiningum, skulu vit her bara greiða frá teim niðurstøðum, sum búskaparfrøðin er komin til í greiningunum av, hvaðan búskaparvøkstur kemur.

## Niðurstøður frá vakstrarteori

### *Kapitalapparat, útbúgving og framleiðslutøkni*

Sambært elstu myndlunum um búskaparvøkstur frá 1950unum eru rík lond rík, tí tey gera stórar íløgur per íbúgva í humant kapitalapparat, t.e. útbúgving, og fysiskt kapitalapparat, og tí tey brúka kapitalapparatið skilagott.

Men hagfrøðiligar kanningar við hesum myndlum vísa samstundis á, at lyklaorðið er produktivitetur fyri givna nøgd av humanum og fysiskum kapitali. Í 1988 var framleiðslan fyri hvørt arbeiðsfólk í teim fimm londunum við størstu framleiðsluni per íbúgva umleið 32 ferðir størri enn í teim fimm londunum við minstu framleiðsluni. Um allar eindir av kapitalapparati í heiminum vóru líka produktivar hevði framleiðslan í fimm teim ríkastu londunum bara verið umleið fýra ferðir størri enn í fimm teim fátækastu londunum. Meginparturin av muninum stóðst sostatt ikki av munum í nøgd av fysiskum og humankapitali, men av, at hvør eind av hesum framleiðslumiðlum var nógv meira produktiv í ríku londunum enn í fátæku londunum.

### *Gransking og herming*

Sambært vakstrarteori frá 1980unum er øking í produktivitetinum per framleiðslueind úrslit av miðvísari gransking. Meiri orka verður sett av til gransking, skjótari veksur vitanarstøði og harvið eisini framleiðslustøði. Gransking er her nýtt í breiðari merking, sum allur aktivitetur, tað verið seg í einum granskingarumhvørvi ella í eini fyritøku, sum hevur til endamáls at finna nýggjar og betri hættir "at gera tingini uppá".

Útbyggingar av vakstrarteoriini frá 1980unum býta heimsins lond í tveir bólkar, nevniliga leiðara lond og fylgjara lond. Leiðara lond skumpa tøkniligu frontlinjuni frameftir. Í hesum londunum er produktivitetsvøkstur í høvuðsheitum úrslit av tøkniligum frambrotum, sum standast av gransking.

Í fylgjaralondum er produktivitetsvøkstur í størstan mun fingin í lag gjøgnum samhandil, beinleiðis útlendskar íløgur, leigu av tøkni og við samstarvi við útlendskar fyritøkur. Hetta gevur møguleika fyri atgongd til, herming eftir og útbreiðslu av tí tøkni, sum verður framleidd í mest framkomnu londunum, heldur enn gjøgnum lokala gransking. Hesi londini fylgja sostatt aftan á leiðara londini við at kopiera og tillaga ta tøkni og teir "best-practice" framleiðsluhættir, sum verða uppfundnir í leiðara londunum.

### *Bygnaðarlig viðurskifti*

Hóast øll lond í prinsippinum hava atgongd til somu nøgd av vitan, so er ikki vist, at tey nýta hesa vitan á líka skilagóðan hátt. Førdi politikkurin kann í nøkrum londum viðføra forðingar fyri at einstaka fyritøkan kann og hevur tilskundan til at taka til sín meira produktiva tøkni og skifta til meira produktivar arbeiðshættir. Úrslitið av hesum er, at slíkar forðingar fyri skilagóðari tillaging hjá tí einstøku fyritøkuni føra til munir í framleiðslu fyri hvørja eind av framleiðslumiðlum.

Sambært nýggjastu búskaparfrøðini er meginparturin av muninum í inntøkustøði millum lond úrslit av hesum munum í produktiviteti per kapitaleind, tað vil siga úrslit av munum í nýtslu av tøkari tøkni.

Henda niðurstøða fær stuðul í hagfrøðisligum kanningum, sum vísa, at munir í íløgukvotum, produktiviteti og harvið eisini framleiðslu per íbúgva hava grundleggjandi samband við munir í bygnaðarligum viðurskiftum millum lond.

Lond við góðum bygnaðarligum viðurskiftum hava stórt kapitalapparat og høgt útbúgvingarstøði per íbúgva og høgan produktivitet per kapitaleind. Í somu kanningum hava búskaparfrøðingar eisini funnið fram til, at flest øll onnur viðurskifti hava lítlan og ongan týdning, tá hædd verður tikin fyri bygnaðarligum viðurskiftum.

Hóast fyrivarni skulu takast fyri úrslitum frá slíkum kanningum, gevur tað greiðar ábendingar um, at bygnaðarlig viðurskifti hava nógv størsta týdningin fyri, hvussu inntøkustøðið hjá einum landi er.

Breið semja er íkomin millum búskaparfrøðingar um at uppsparings- og íløguatferð, tilskundan til framleiðslu osfr. eru millumliggjandi ávirkanir á búskaparvøkstur og menning, sum í sínum lagi verða ávirkaðar av politiska og bygnaðarliga umhvørvinum. Hetta kann setast upp sum víst niðanfyri:

Bygnaðarlig viðurskifti → íløgustøði, útbúgvingarstøði, produktivitetur per kapitaleind → samlaður produktivitetur, t.e. inntøkustøði

## Ein spurningur um politikk

Grundleggjandi premissin í hesi frágreiðingini er tí, at munir í inntøkustøði millum lond ikki er orsakað av, at nøkur fólkasløg eru klókari enn onnur, at nøkur lond hava størri náttúruríkidømi per íbúgva enn onnur ella av øðrum meira ella minni náttúrugivnum orsøkum. Munir í inntøkustøði millum lond er í síðsta enda ein spurningur um innrætting av samfelagsligum bygnaðum, tað vil siga ein politiskur spurningur.

# Bygnaðarlig viðurskifti

Adam Smith, endurgivin í Gylfason (2000), skrivaði longu í 1776, at ”Kina letur til at hava staðið í stað leingi, og er sannlíkt fyri langari tíð síðan komin á tað inntøkustøðið, sum landsins lógir og bygnaðarligu skipanir loyva. Men hetta inntøkustøðið er helst nógv lægri, enn hvat landsins náttúruríkidømi og støða annars høvdu givið møguleika fyri við øðrum lógum og bygnaðarligum skipanum.”

Sostatt er tankin um, at bygnaðarlig viðurskifti hava avgerandi ávirkan á inntøkustøðið í einum landi, ikki nýggjur fyri búskaparfrøðingar. Tað er tó ikki fyrr enn seinastu 15 árini at ástøði eru framleidd, sum geva samanhangandi forkláringar uppá, hví og hvussu bygnaðarlig viðurskifti hava týdning fyri støddina av kapitalapparati, útbúgvingarstøði og produktiviteti per kapitaleind, og harvið fyri samlaða produktivitetin í einum landi.

## Hvat eru “bygnaðarlig viðurskifti”?

Bygnaðarlig viðurskifti eru menniskjaskaptu spælireglurnar í einum samfelag. Tey eru meinlík leikreglunum í eini ítrótt. Tað vil siga, at tey eru samansett av formellum niðurskrivaðum reglum og óformellum bindingum, so sum óskrivaðum reglum fyri atferð, sum undirbyggja og virka sum ískoyti til niðurskrivaðu reglurnar. Haraftrat er ein týdningarmikil táttur, hvussu hesar reglur verða handhevdar.

Ein annar háttur at siga hetta uppá er, at bygnaðarlig viðurskifti eru felags loysnir upp á afturvendandi trupulleikar, ið standast av sosialum samskifti. Sostatt hava bygnaðarlig viðurskifti eina ógvuliga breiða merking, til dømis eisini moralskar uppfatanir av, hvat er rætt og skeivt. Meiningin við teimum er at definera og avmarkað valmøguleikarnar hjá teimum, sum fella inn undir reglurnar. Tey leiða tilskundanini í mennaskjansligum samskifti í ávísar ættir, antin tað er politiskt, sosialt ella búskaparligt.

Við bygnaðarlig viðurskifti í samband við búskaparligt virksemi meina vit tað undirstøðukervið, ið skipar búskaparliga umhvørvið, har persónar savna sær vitan og lærdóm, fyritøkur savna sær kapitalapparat og framleiða vørur og tænastur, brúkarar og fyritøkur keypa og selja vørur og tænastur osfr.

Dømi eru lógarverk, ognarrættur, undirvísingarverk og fysiskt undirstøðukervi. Haraftrat eru mekanismur sum lætta um handilsligt virksemi og handhevja gjørdar avtalur týðandi partur av bygnaðarligu viðurskiftunum. Til dømis eru gjørdar avtalur ofta virðisleysar uttan eina vælvirkandi rættarskipan, har trætur, um hvat hesar avtalur innibera og hvørt tær verða handhevdar, kunnu viðgerast.

### Nøkur týðandi hugtøk

**Framleiðsla og kradding**

Virksemi, sum førir til privatbúskaparligan vinning, kann bólkast í tvey: framleiðsla ella kradding. Framleiðsla merkir í hesum sambandi vanligt virksemi á vinnuliga marknaðinum, t.e. framleiðsla av vørum og tænastum til sølu.

Men búskaparligar avgerðir verða ikki bara tiknar á vinnuliga marknaðinum ella innanhýsis í fyritøkum. Tær verða eisini tiknar umvegis, gjøgnum ávirkan á politiskar avgerðir. Í hesi frágreiðingini definera vit kradding (enska heitið í búskaparfrøðini er “grabbing”) sum eitt og hvørt

virksemi, sum hevur til endamáls at skaffa sær ella sínum áhugabólki privatbúskaparligan vinning gjøgnum sersømdir frá politisku skipanini, tað verið seg serligar skattalættar, ókeypis tilfeingi, alment monopol, almenna hjálp til fyritøkur at sleppa undan húsagangi osfr. Hetta umfatar sostatt bæði lobbyvirksemi fyri at fáa sersømdir, so sum at leggja trýst á politikkarar, skriving í bløðum ella líknandi og tað virksemi, sum ger sær dælt av vunnu sersømdunum, til dømis spekulatión í sambandinum millum fiskiloyvir og kvadratrøtur.

**Kappingarføri**

Ein týðandi partur av búskaparligari menning er framkoma av nýggjum hættum at gera tingini uppá. Øll dømi um væleydnaða menning og hækkandi produktivitet eru í síðsta enda samlaða úrslitið av einstøkum avgerðum hjá einstaklingum at gera íløgur í verkætlanir við stórum vága og í heila tikið at royna nakað nýtt og ókent.

Men fólk og fyritøkur flest fáast bara við tað, sum gevur teimum sjálvum størst privat nettoavkast. Fremsta uppgávan hjá tí einstaku fyritøkuni er at vera kappingarfør. Ein fyritøka er kappingarfør, tá framleiðslan yvir eitt longri tíðarskeið gevur minst líka stórt avkast til framleiðslumiðlarnar, t.e. arbeiðsmegi, kapitalapparat, rávørur osfr., sum teir kundu fingið í aðrari framleiðslu. Fyri fyritøkuna kann tað vera líkamikið um kappingarførið stendst av produktiviteti ella av øðrum ávum, sum til dømis monopolstøðu, sersømdum frá politisku skipanini ella líknandi. Tí eru produktivitetur og kappingarføri ikki sama fyribrigdi og ikki neyðturviliga samanfallandi.

Kapping á vinnuliga marknaðinum økir produktivitetin við at geva leiðslum í fyritøkum tilskundan til at finna nýggjar hættir at framleiða, minka um spill í framleiðsluni, og at betra um framleiðslubygnaðin. Kappingin syrgir fyri, at um ein fyritøka ikki klárar at økja produktivitetin í einum dynamiskum og skiftandi umhvørvi, antin tað er at betra raksturin av verandi framleiðslu ella tað er at skifta til aðra framleiðslu ella marknaðir, so gevur hon ikki líka stórt avkast til kapital og arbeiðsmegi, sum aðrar fyritøkur kunnu bjóða, og verður trýst av marknaðinum. Hinvegin, um ein fyritøka vinnur óvanliga stórt avkast til kapital og arbeiðsmegi, so er tað eisini kapping frá nýggjum kappingarneytum, sum skal trýsta avkastið niður aftur á eitt støði, sum svarar til samfelagsliga avkastið.

## Marknaðir og vinnuligar leikreglur

Ein marknaður er eitt tól ella ein tøkni, sum framleiðarar og brúkarar brúka til at samráða seg fram til, hvat skal framleiðast og til hvønn prís. Tann einstaki marknaðurin er tann samráðingartøkni, sum náttúrligar og tøkniligar bindingar skapa saman við tí regluverki, sum tað almenna hevur sett upp.

Týdningarmesti parturin av marknaðartøknini er vinnuligu leikreglurnar. Vinnuligu leikreglurnar eru regluverkið fyri virksemi á marknaðunum. Tær avgera, hvørja tilskundan aktørarnir hava til ymisk sløg av búskaparligum virksemi, tí tær eru avgerandi fyri, í hvønn mun framleiðsla er meira profitabul enn kradding.

Væl skipaðir marknaðir skapa møguleikar fyri vinningi til produktivt virksemi. Teir loyva fólki at brúka síni evni og sítt tilfeingi at fáast við produktivar aktivitetir. Teir eru skorðaðir av leikreglum, ið skapa gjøgnumskygni á marknaðinum, og gera tað møguligt at handhevja ognarrættindi og gjørdar avtalur og at hava eftirlit við kappingini á marknaðinum.

Hinvegin kunnu vánaligar vinnuligar leikreglur forða fólki í at brúka síni evni og tilfeingi til produktivt virksemi og geva heldur møguleikar fyri stórum privatbúskaparligum avkasti við

kradding. Slíkar vinnuligar leikreglur eggja persónum og fyritøkum til at spesialisera seg í kraddaravirksemi heldur enn í produktivari framleiðslu.

Útbúgvingarstøði og stødd av kapitalapparati, eins og hvussu munadygt hesi eru samansett til at skapa framleiðslu, eru nær tengd at leikreglunum fyri vinnuligum virksemi. Eingin tilskundan er til at gera íløgur í útbúgving, kapitalapparat og produktiva framleiðslu, um tað ikki finnast vælvirkandi marknaðir, har slíkar íløgur kunnu vinna eitt rímuligt avkast.

## *Vinnuligi marknaðurin*

Á vinnuliga marknaðinum fer fram produktiv framleiðsla og býti av framleiðsluni millum brúkarar. Vælvirkandi vinnuligir marknaðir í einum støðugum sosialum umhvørvi eru av altavgerandi týdningi fyri búskaparligan effektivitet, og serliga fyri framhaldandi tillaging av búskaparligum virksemi til broyttar umstøður.

Á vinnuliga marknaðinum eru aktørarnir fyrst og fremst fyritøkur og brúkarar, men á marknaðunum fyri framleiðslumiðlar eru eisini aðrar eindir so sum fakfeløg, arbeiðsgevarafeløg og fíggingarstovnar millum aktørarnar. Umframt at áseta vinnuligu leikreglurnar er politiska skipanin eisini dómari á hesum marknaðinum, til dømis í skapi av Kappingarráðið, Fjarskiftiseftirlitið ella líknandi.

Haraftrat avgera vinnuligu leikreglurnar, hvussu væl vinnuligu marknaðirnir virka. Nógvir kostnaðir kunnu vera knýttir at handlum í einum marknaði. Manglandi gjøgnumskygni, trupulleikar við at áseta og handhevja ognarrættindi og við at tryggja at gjørdar avtalur verða hildnar kunnu gera, at tað kann vera dýrt at gjøgnumføra handlar á marknaðinum. Hesir kostnaðir gera tað trupult at fáa í lag vælvirkandi vinnuligar marknaðir.

Men skilagóðar vinnuligar skipanir kunnu minka um hesar kostnaðir. Skilagóðar vinnuligar leikreglur áseta og handhevja ognarrættindi, handhevja gjørdar avtalur og hava eftirlit við kappingini. Tær eru á henda hátt við til at skapa tryggleika og gjøgnumskygni í handilsligum virksemi. Fyri effektiva kapping á vinnuliga marknaðinum eru slíkar vinnuligar leikreglur altavgerandi, tí tær minka mest møguligt um kostnaðirnar í samband við transaktiónir á marknaðinum. Vinnuligu leikreglurnar avgera sostatt, hvørt kappingin á vinnuliga marknaðinum er so frí og kostnaðarlítil sum gjørligt.

Dynamisk og effektiv kapping á vælvirkandi marknaðum skapar samanfall millum produktivitet og kappingarføri, og er soleiðis drívmegi til framhaldandi produktivitetsøkingar. Veruliga styrkin hjá einum vælstýrdum marknaðarbúskapi er at meginparturin av vinnuliga virkseminum fyrigongur sum kapping á vinnuliga marknaðinum, tí hetta skapar samanfall millum kappingarføri og produktivitet.

Kapping á vinnuliga marknaðinum er sostatt grundleggjandi drívmegin aftanfyri framhaldandi hækkandi produktivitet og harvið framhaldandi hækkandi inntøkustøði, hóast tað yvir styttri tíðarskeið ofta eru privatur vinningur, ið ikki svarar til samfelagsliga avkastið, og spill av framleiðslumiðlum, sum síggjast týðuligast. Hetta viðførir ein stóran leiklut til politisku skipanina fyri langtíðar búskapargongdini, tí tað er politiska skipanin, ið ásetur og handhevjar leikreglurnar.

## *Vinnupolitiski marknaðurin*

Vinnupolitiski marknaðurin er staðið, har kradding og politisk togtogan millum áhugabólkar um politiskt stýrt feingi fer fram, til dømis dystir um studningar og onnur serrættindi. Tað vil siga at her

fer fram ein dystur um at ogna sær virðir, ið vera framleidd aðrastaðni í búskapinum fyri minni enn tann prís, feingið hevði kostað á vinnuliga marknaðinum.

Spælararnir á vinnupolitiska marknaðinum eru áhugabólkar, t.e. persónar knýttir saman av eini felags hugsjón um at náa nøkur felags mál. Dømi um áhugabólkar eru fyritøkur, politiskir flokkar, arbeiðarafeløg og onnur. Týdningarmesti spælarin á hesum marknaðinum er politiska skipanin, t.e. løgtingi og teir politikkarar, ið har sita, tí tað er her avgerðirnar í síðsta enda verða tiknar.

Á vinnupolitiska marknaðinum er tað aldrin produktivitetur í framleiðslu, sum avger, um lívsgrundarlag er fyri eini fyritøka, heldur tvørturímóti. Ofta er fremsta orsøkin til at fyritøkur verða tiknar upp á vinnupolitiska marknaðinum júst, at tær ikki eru kappingarførar á vinnuliga marknaðinum.

### *Samband millum marknaðirnar*

Úrslit av virkseminum á vinnuliga marknaðinum ávirkar, hvør roynir at arbeiða á vinnupolitiska økinum. Til dømis er vanligt, at fyritøkur í útflutningsvinnu, ið ikki eru kappingarførar á vinnuliga marknaðinum, royna at sleppa inn á vinnupolitiska marknaðin.

Aktørar á vinnupolitiska marknaðinum royna samstundis at ávirka politikararnar at áseta leikreglur, sum framhaldandi geva fríar ræsur á vinnupolitiska marknaðinum fyri teirra áhugamálum. Til dømis verður nógv lobbyvirksemi ført fyri at ávirka politisku skipanina til at halda fram við almenna politikkinum at lata útvaldum serstakan studning, ókeypis fiskatilfeingi osfr.

Ávirkanin millum vinnuliga og vinnupolitiska marknaðin gongur eisini hinvegin, um enn meira óbeinleiðis. Serliga hevur samlaða úrslitið av búskaparliga virkseminum í landinum ávirkan á almennu uppfatanirnar av, hvussu búskapurin er háttaður, og hvussu hann eigur at skipast. Til dømis kann stóra arbeiðsloysi í Suðuroynni í løtuni fáa nøkur at halda, at tað almenna eigur at blanda seg beinleiðis í vinnuliga virksemið í oynni.

**Føroysk dømi**

Eitt gott føroyskt dømi um hvat leikreglurnar gera, er alt tosið sum var upp gjøgnum nýtiárini um, at skipaflotin varð vorðin ov gamal – og tað tí var neyðugt við stuðuli úr landskassanum til skipabygging. Hetta gjørdist ein sjálvuppfyllandi profeti, við tað at ongin vildi byggja skip, so leingi tað ikki var greitt, um nakar stuðul fór at verða veittur ella ikki. Tá so tásitandi Landstýri loksins skar ígjøgnum og boðaði frá, at ongin stuðul fór at koma, kom hol á skipabyggingina – og síðani eru ikki so fá nýggj skip bygd, hóast hetta varð sagt at vera púra ógjørligt uttan almennan stuðul.

Eitt annað dømi, har tað almenna hinvegin sveik, eru ókeypis fiskirættindini og skattalættin til fiskimenn, sum saman við fríari kapping um fiskin hava gjørt, at lønirnar í fiskiskapi gjørdust met høgar (í hvussu so er í góðum fiskiárum). Hetta elvdi til sera stóran mun millum avkast á landi og á sjógvi hjá ófaklærdum, sum so aftur førdi til methøg lønarkrøv seinasta vár[1]. Úrslitið var 9½% í lønarvøkstri yvir 2 ár, sum so aftur førir til at fiskavirkini til tess at varðveita kappingarførið fyri liðugtframleiðsluna bjóða lægri prís fyri rávøruna tí at lønarútreiðslurnar eru hækkaðar – so nú er skattalættin til fiskimenn býttur millum fiskimenn og ófaklærd á fiskavirkjunum. Men marknaðurin

[1] Hartil kemur, at skipanin førir til størri íløgur enn annars í skip, tí avkastið er yvirnormalt høgt vegna ókeypist fiskatilfeingi og lítið trýst frá Fiskimannafelagnum um hægri hýrur (fiskimenn hava í staðin fingið skattalætta). Soleiðis hava reiðararnir fingið sín part av skattalættanum. Hinvegin hevur skilligt nokk verið stórt trýst um hægri hýrur fyri alment lønt umborð á strandfara- og vaktarskipum.

er jú opin – og tískil fer nógvur fiskur óviðgjørdur av landinum. Hetta elvir so aftur til krøv um at forða fyri útflutningi av óviðgjørdum fiski.

So í staðin fyri at troyta vinnuliga marknaðin – og lata løn til manning og arbeiðsfólk vera eitt mál millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum - er málið ført inn á vinnupolitiska marknaðin. Úrslitið er minni tillaging av framleiðsluni í vinnuni til marknaðarligu umstøðurnar.

## Hvar koma vinnuligu leikreglurnar frá?

Vinnuligu leikreglurnar verða í síðsta enda ásettar av politiska myndugleikanum, tí politiska skipanin setur tær spælireglur, sum politiska skipanin sjálv og restin av samfelagnum má fylgja. Men politikkararnir gera ikki leikreglurnar í einum sosialum tomrúmi. Týðandi ávirkan er eisini frá vinnupolitiska og vinnuliga marknaðinum til politisku skipanina. Ávirkanin frá vinnupolitiska marknaðinum er beinleiðis í skapi av lobbyvirksemi og líknandi. Ávirkanin frá vinnuliga marknaðinum er meira óbeinleiðis, gjøgnum tey úrslit sum standast av kappingini á hesum marknaðinum. Til dømis vil arbeiðsloysi í ávísum pørtum av landinum hava ávirkan á tær vinnupolitisku avgerðir, sum verða tiknar í politisku skipanini. Tað vil siga, at allar týðandi avgerðir, sum verða tiknar av politisku myndugleikunum eru úrslit av eini politiskari tilgongd, har verandi leikreglur og verandi áhugabólkar skapa nýggjar leikreglur og nýggjar áhugabólkar.

Vit kunnu til dømis hugsa okkum at tíðaravmarkað tiltøk verða sett í verk fyri at verja eina vinnu í eitt tíðarskeið. Hesi tiltøk eggja til at gera íløgur í hesa vinnu ella í hvussu so er til ikki at flyta kapital úr vinnuni, og tað er júst meiningin við teimum. Men tá íløgur á henda hátt eru bundnar í vinnuni, verða eigararnir av kapitalapparatinum ein áhugabólkur sum fær vinning av at tiltøkini ikki verða strikað aftur. Í hesum førinum er tað leikreglurnar, ið skapa seráhugamál, heldur enn at tað eru seráhugamálini, sum skapa leikreglurnar.

Besta føroyska dømi um, har tað bar til at gera nakrar bygnaðarligar skipanir um eina vinnu heilt frá botni er oljuvinnan í Føroyum. Oljuvinnan hevði als ongar røtur í Føroyum, áðrenn tað kom upp á tal at fara at leita eftir olju á føroyskum øki. Tí bar til at hava eitt demokratiskt kjak og at framleiða eina lóggávu fyri virksemið í hesi vinnuni, áðrenn seráhugamálini høvdu møguleika fyri at skipa seg í vælvirkandi lobbyir.

Hetta er beint tvørturímóti tí, sum er hent í fiskivinnuni. Fiskivinna var í Føroyum, langt áðrenn lógarverk, vitan um áseting av reglum fyri búskaparligum virksemi osfr. vóru komin nakran veg. Tá nágreiniligar skipanir skuldu gerast fyri vinnuligan fiskiskap vóru seráhugamálini sostatt langt síðan skipað í sera væl samansjóðaðar bólkar við stórari politiskari ávirkan.

**Almenn tænastuveiting mótvegis vinnuligum virksemi**

Evnið í hesi frágreiðingini er, hvørt leikreglurnar fyri vinnuligum virksemi gjøgnum at skapa samanfall millum kappingarføri og produktivitet virka fyri, at framleiðslueindirnar eru so effektivar sum gjørligt. Tá vit tosa um virksemi á vinnuliga marknaðinum og vinnupolitiska marknaðinum meina vit bara við virksemi, sum hevur til endamáls at skapa peningaligt avkast til eigararnar av framleiðslueindini.

Hvørt sjúkrahús, skúlar, eldrarøkt osfr. verða rikin so effektivt sum gjørligt verður tí ikki viðgjørt í hesi frágreiðingini.

# Góðar bygnaðarligar skipanir

## Skipað margfaldni

### *Skipað kapping*

Búskaparvøkstur, t.e. hækking í inntøkustøðinum, er úrslit av eini tilgongd í einum búskapi, har einstaklingar og fyritøkur, ið stremba eftir privatbúskaparligum vinningi, fáa avkast av at leita eftir nýggjari og betri framleiðsluhugskotum. Men drívmegin í einum privatkapitalistiskum búskapi er ikki av sær sjálvum móti nýskapan. Endamálið við virkseminum hjá einari og hvørjari fyritøku er at skapa so stórt avkast sum gjørligt til eigararnar, tí náttúrliga drívmegin er einans móti privatbúskaparligum vinningi.

Frá einum samfelagsligum sjónarmiði er endamálið við allari framleiðslu hinvegin at skapa brúksmøguleikar hjá borgarunum. Tí vilja vit hava fyritøkurnar í landinum at brúka framleiðslumiðlarnar soleiðis, at teir skapa so nógv gagn sum gjørligt til brúkararnar. Um framleiðslan sum gevur brúkarunum mest gagn er upsablokkur ella farteldutænastur, og um tað er við gomlum maskinum ella við nýggjastu tøknini er so upp til framleiðarar og brúkarar á marknaðinum at finna útav.

Ein fyritøka tillagar seg alla tíðina teim umstøðum, hon arbeiðir undir. Ger hon ikki tað, fer hon av knóranum. Tað er í stóran mun vinnuligu leikreglurnar, ið avgera, hvørjum umstøðum fyritøkurnar arbeiða undir. Ein fyritøka vigar tí altíð møguleikarnar á vinnuliga marknaðinum móti møguleikunum á vinnupolitiska marknaðinum. Jú truplari vinnuligi marknaðurin, jú størri er incitamentið at troyta vinnupolitiska marknaðin. Rækjuskipini eru eitt gott dømi um hetta.

Góðar bygnaðarligar skipanir eru tær, sum tæna endamálinum um framhaldandi inntøkustøði og harvið framhaldandi øking av búskaparligu vælferðini hjá borgarunum. Í praksis eru góðar bygnaðarligar skipanir tí tær, ið gera produktivitet og nýskapan í framleiðslu fyrimunarligt fyri tey, ið stremba eftir privatum vinningi.

Avmarkingar av møguleikum fyri kradding eru grundleggjandi partur av fyrimunarligum vinnuligum undirstøðukervi. Eitt gott vinnuligt regluverk tippir so nógv hol sum gjørligt, har fólk annars kundu brúkt tíð og orku upp á at fingið privatbúskaparligar fyrimunir á annan hátt enn við framleiðslu. Tá leita einstaklingar og fyritøkur eftir betri hættum at skapa, framleiða og selja vørur og tænastur, heldur enn at leita eftir betri hættum at fáa tilfeingi frá tí almenna.

### *…Í vælvirkandi sosialum undirstøðukervi*

Ein marknaðarbúskapur er neyðturviliga gróðursettur í ikki-marknaðarligum undirstøðukervi, sum til dømis lógarverkið, sosialum trygdarskipanum osfr. Fyri at marknaðirnir skulu virka væl er neyðugt, at marknaðirnir verða stuðlaðir av hesum undirstøðukervi heldur enn fjøtraðir.

Haraftrat kann eitt dynamiskt vinnulív viðføra stóra útskifting av fyritøkum, framleiðsluhættum og framleiðslustøðum. Hetta setur stór krøv til fleksibilitet hjá arbeiðsmegini bæði viðvíkjandi arbeiðsuppgávum og arbeiðsstøðum. Áhugabólkar, sum til dømis eigarar ella arbeiðstakarar í serligum vinnum, ið hava fyrimunir av verandi vinnubygnaði, kunnu arbeiða ímóti vinnuligari tillaging.

Hvussu stórur politiski viljin er at góðtaka, at nøkur kunnu missa arbeiði og inntøkur í eitt tíðarskeið av eini vinnuligari tillaging, hevur stóran týdning fyri tillagingargongdina. Neyðugt er tí við

bygnaðum, sum í størri mun gera almenningin til reiðar at góðtaka ta konstantu tillaging hetta hevur við sær. Hetta verður gjørt við samfelagsligum undirstøðukervi, sum minkar mest møguligt um stutttíðarkostnaðin fyri borgaran av framhaldandi vinnuligu tillagingini av framleiðsluni.

## Týdningarmiklar skipanir

Vit definera tí ideellu vinnuligu leikreglurnar sum tær, ið skapa samanfall millum stremban eftir vinningi og stremban eftir produktiviteti í framleiðslu. Sosiala undirstøðukervi, til dømis arbeiðsloysisskipan og heilsuverk, verður so mett eftir, hvussu væl tað stuðlar undir og skapar støðufesti fyri vinnuligu leikreglunum.

Vit kunnu nevna seks sløg av marknaðarvinarligum bygnaðarligum skipanum: ognarrættindi, vinnuligar eftirlitsskipanir, fysiskt undirstøðukervi, makrobúskaparlig stabilisering, sosialar tryggingar og skipanir til viðger av trætum. Tvær tær fyrstu eru skipanir, sum skapa samanfall millum stremban eftir privatbúskaparligum vinningi og produktiviteti, tríggjar tær seinastu eru skipanir, sum stuðla undir tvær tær fyrstu, meðan tann triðja hevur ávirkan á bæði viðurskifti, sum greitt verður frá niðanfyri.

### *Ognarrættindi*

Týdningarmesti parturin av vinnuligu leikreglunum er ognarrætturin. Ein marknaðarbúskapur virkar ikki væl, uttan so at ognarrættindi til feingi eru staðfest. Ognarrætturin hevur í hesum sambandi eitt reint funktionelt grundarlag. Ognarrætturin gevur avgerðarrætt, nevniliga rætt at brúka ella selja feingið, rætt til at forða øðrum atgongd til feingið og rætt til møguligt avkast, sum feingið skapar. Formlig ognarrættindi hava sostatt ongan týdning, um tey ikki geva avgerðarrætt.

Búskaparligi týdningurin av hesum er greiður. Einstaklingar og fyritøkur hava bara tilskundan til at gera íløgur í at viðlíkahalda ella økja um virðið á feingi, um tey hava ognarrættin til avkastið. Greitt staðfest ognarrættindi útihýsa samstundis møguleikanum fyri, at vinningur er í at skava tilfeingi undir seg, sum eingin klárur ognarrættur er til. Greitt ásett ognarrættindi geva sostatt tilskundan til produktivt virksemi heldur enn til kradding.

### *Vinnuligar leikreglur og eftirlit*

Løtt atgongd til vinnuligu marknaðirnar er alneyðug fyri dynamikkin í vinnulívinum. Við lættari atgongd til marknaðin hava nýggjar og lítlar fyritøkur, sum ofta mangla sosial ella vinnulig sambond, størri møguleikar at bjóða seg fram til vinnuliga framleiðslu. Hetta tryggjar, at tað alla tíðina eru tær mest produktivu fyritøkurnar sum eru kappingarførar.

Fyri at tryggja lætta atgongd til vinnuligu marknaðirnar krevjast skilagóðar vinnuligar leikreglur. Oftast er fremsta forðingin fyri effektivari kapping hinvegin, at myndugleikarnir áseta óhepnar leikreglur, sum forða heldur enn lætta um atgongd til marknaðirnar. Avlagandi leikreglur standast ofta av ov tøttum sambandi millum myndugleikar og verandi fyritøkur á marknaðinum. Úrslitið er at alment ásettar reguleringar diskriminera móti nýggjum og lítlum fyritøkum. Ein fortreyt fyri skilagóðum vinnuligum leikreglum er tí ein sterk almenn umsiting, sum kann standa ímóti lobbyvirksemi frá verandi fyritøkum á einum marknaði.

Vanligasta privata forðingin fyri kapping á einum marknaði er, at ein ella tvær fyritøkur seta seg á marknaðin. Hesir møguleikar fyri at monopolisera marknaðir finnast serliga, har marknaðirnir eru lítlir lokalir marknaðir og framleiðslutøknin skapar stórdriftsfyrimunir. Tað kann vera avmarkað,

hvussu nógv myndugleikarnir kunnu bøta um støðuna við at áseta leikreglur, men leikreglurnar eiga í hvussu so er ikki at verða ein forðing fyri atgongd til marknaðin.

Fyri at tryggja, at leikreglurnar verða fylgdar, eigur eitt land at hava sterkar óheftar eftirlitsskipanir, t.e. kappingareftirlit, fjarskiftiseftirlit osfr., sum aftur eiga at vera undirlagdar óheftar dómstólar. Allir vælvirkandi marknaðarbúskapir eru undir umsjón av fleiri eftirlitsmyndugleikum, sum skipa atferðina á marknaðum fyri vørur, tænastur, arbeiðsmegi osfr. Í veruleikanum er tað so, at jú fríari marknaðirnir eru, tess størri er ábyrgdin hjá eftirlitsmyndugleikunum at syrgja fyri, at atferðin hjá aktørunum á marknaðinum er sambærilig við leikreglurnar. Til dømis er tað ikki av tilvild, at USA hevur heimsins fríasta marknaðarbúskap og samstundis heimsins strangastu kappingarreglur.

### *Undirstøðukervi*

Týdningarmiklir partar av undirstøðukervinum fyri arbeiðsmarknaðin er til dømis vælvirkandi almanna- og sjúkrahúsverk, gott ferðasamband, íbúðarmarknaður, atgongd til eftirútbúgving og reglur fyri setan og og uppsøgn av starvsfólki. Fyri tey ungu er tað serliga undirvísingarverkið, sum hevur týdning. Umframt at geva teimum førleikar, sum tey kunnu brúka á arbeiðsmarknaðinum, skal tað eisini geva teimum barlast til at klára seg í samfelagnum sum heild og til at kunna vera við í avgerðum um, hvussu samfelagið skal innrættast. Eitt virki granskingarumhvørvi hevur eisini fingið alsamt størri týdning.

Viðvíkjandi vinnuligum virksemi hevur støddin á marknaðinum stóran týdning bæði fyri, um tað loysir seg at brúka pengar upp á nýggja tøkni, og hvussu lætt tað er at monopolisera marknaðin. Fysiskt undirstøðukervi, t.e. vegir, tunnlar, ferjusamband osfr. og telefonnet, alnót osfr. hevur avgerandi týdning fyri, hvussu stórur marknaðurin hjá tí einstøku fyritøkuni er, bæði fyri keyp av framleiðslumiðlum og fyri sølu av framleiðsluni.

Føroyski heimamarknaðurin er sera lítil sum er. At hava ein lokalan marknað fyri Suðuroynna, ein fyri Norðoyggjar osfr. ger marknaðirnar so lítlar, at skalafyrimunir í framleiðsluni ofta gera tað sera lætt at monopolisera marknaðin. Haraftrat loysir seg ofta illa at brúka pening upp á at innføra ofta dýra nýggja tøkni ella nýggjar arbeiðshættir á einum lítlum marknað, tí trupult kann vera at forrenta íløguna. Gott fysiskt undirstøðukervi integrerar fleiri smáar marknaðir í ein stóran marknað. Hetta skapar størri kapping og harvið størri framdrift.

Haraftrat kann betri fysiskur infrastrukturur gera tað truplari at fáa undirtøku fyri øðrum tiltøkum, sum til dømis serligar studningar til vinnulívið í pørtum av landinum, har undirstøðukervið ikki er so gott. Betri ferðasamband kann vera við til at forða fyri studningstiltøkum til útvaldar fyritøkur í økjum, sum eru fyri serstøkum negativum árinum.

Til dømis er eingin ivi um, at ein høvuðsorsøk til at Suðuroy er so nógv verri fyri enn restin av landinum er, at oyggin liggur so lutfalsliga avsíðis, soleiðis at hon er ikki nóg væl integrerað í restina av búskapinum. Hetta gevur gróðrarbotn fyri krøvum um serlig studningstiltøk fyri vinnulívið í Suðuroynni.

Sum eitt síðsta dømi kann nevnast, at av tí at mest sum alt búskaparligt virksemi er tengt at møguleikunum fyri fígging, er sera umráðandi við einum vælvirkandi fíggjarkervi. Leikreglur fyri fíggjarkervi eru til dømis bankalógir, partafelagslógir, tinglýsingarlóg, konkursreglur osfr. Hesar avgera, hvussu effektivt fíggjarligur kapitalur verður fluttur frá virksemi við lágum avkasti til virksemi við hægri avkasti, til dømis nær ein fyritøka, sum ikki er kappingarfør, verður afturlatin, og hvussu effektivt aktivini hjá einum trotabúgvi verða flutt í aðra framleiðslu, og tær hava tí avgerandi týdning fyri samlaðu virðisskapanina í samfelagnum.

## *Viðger av trætum*

Vælvirkandi skipanir til viðger av trætum er avgerandi fyri sosiala støðufestið í einum landi. Mest grundleggjandi er ein demokratisk politisk skipan og vælvirkandi rættarskipan.

Demokratisk politisk skipan gevur í fyrra lagi møguleika fyri at velja frá politiska leiðslu, ið borgararnir ikki eru nøgdir við, og í seinna lagi ger hon allar borgarar til medábyrgdarar fyri, hvussu samfelagið er samansett.

Eitt nútímans samfelag hevur fleiri ymsar stovnar til viðgerð av trætum millum borgarar, fyritøkur, tað almenna osfr., sum hvør hevur serlig ábyrgdarøki. Semingsstovnurin, Kærunevndin hjá Kappingarráðnum, Umboðsmaðurin eru formlig dømi. Eitt meira óformligt dømi er generella semjan um at arbeiðsmarknaðurin skal finna út av sínum viðurskiftum sjálvur uttan uppíblanding frá tí almenna. Í fall semja ikki fæst gjøgnum hesar stovnar verður dómsvaldið nýtt sum evsti kærumyndugleiki. Óheft dómsvald tryggjar øllum møguleika at royna einhvørja trætu, borgarin hevur við aðrar borgarar ella samfelagið sum heild, á uttanveltaðum øki við ópartískum dómara.

## *Sosialar tryggingar*

Meðan ein opin búskapur hevur fyrimunir av øktari kapping og hægri inntøkustøði, so kunnu tær broytingar, sum eru gerandiskostur í einum slíkum búskapi, eisini hava keðiliga ávirkan. Serliga kunnu tillagingar til umskiftandi umstøður gera, at partur av arbeiðsmegini verður uttan arbeiði í eitt tíðarskeið. Í einum nútíðar marknaðarbúskapi eru framhaldandi broytingar, og einstaklingurin er altíð í vanda fyri at missa arbeiði og inntøkur í eitt tíðarskeið. Arbeiðsuppgávurnar broytast tíðum, og flytingar upp og niður á inntøkustiganum koma ofta fyri.

Hóskandi sosial trygging styðjar upp undir ein marknaðarbúskap, tí hon ger marknaðartillagingar sambærligar við sosialt støðufesti og samfesti. Vælvirkandi arbeiðsloysisstuðulsskipan, sum gevur fólki fíggjarligt lívsgrundarlag í eini støðu við arbeiðsloysi, er sjálvandi týdningarmikil. Evnini hjá arbeiðsmarknaðinum at tillaga seg broytiligar umstøður eru best, um arbeiðsmegin kann líta á sosialar trygdarskipanir, meðan leitað verður eftir nýggjum arbeiði, tó sjálvsagt uttan at trygdarskipanin gerst ein koddi. Til dømis hevur ALS havt stóran positivan týdning í Føroyum, síðan skipanin var sett á stovn.

Men bestu tryggingarnar móti arbeiðsloysi og avgerandi fyri, at kostnaðurin av hesum skal vera so lágur sum gjørligt, eru ein vælvirkandi arbeiðsmarknaður, høgt útbúgvingarstøði, sum ger at fólk kunnu átaka sær fleiri arbeiði í einum globaliseraðum heimi, og gott fysiskt undirstøðukervi, sum ger, at fólk ikki eru noydd at flyta hús og heim, um tey skulu skifta arbeiði.

Um tey, sum standa til at missa, tá arbeiðsmarknaðurin tillagar seg broyttar umstøður, hinvegin hava møguleika og tilskundan til at forða fyri at tillagingin hendir, oyðileggur hetta evnini hjá arbeiðsmarknaðinum at tillaga seg.

## *Makrobúskaparlig stabilisering*

Støðugt makrobúskaparligt umhvørvi er ikki ein orsøk til búskaparvøkstur, men heldur ein fortreyt fyri vøkstri. Óstøðugt makrobúskarligt umhvørvi økir óvissuna um avkast av uppsparing, íløgum og nýggjum framleiðslum. Hetta minkar tilskundanina til uppsparing, íløgur og líknandi og er sostatt við til at minka um búskaparvøksturin.

Uppgávan hjá stabiliseringspolitikkinum er at skapa støðugt makrobúskaparligt umhvørvi, til dømis lítil konjuktursveiggj, lága inflatión og burðardygga almenna skuldarstøðu. Hetta krevur støðugan

ella konjukturmótgangandi fíggjarpolitikk. Men hvørt búskaparpolitikkurin virkar fyri støðugum makrobúskaparligum umhvørvi er tó mest av øllum tengdur at viljanum hjá politikkarum at føra skilagóðan konjukturpolitikk, heldur enn at faktisku gongdini í búskapinum.

Viljin hjá politisku myndugleikunum at føra konjukturmótgangandi búskaparpolitikk er í stóran mun tengdur at politisku tilgongdini innanfyri ásettu leikreglurnar. Tí ber við hvørt til at betra viljan hjá politikkarum til at føra skilagóðan konjukturpolitikk við vælskipaðum politiskum leikreglum. Til dømis hevur ES savnað pengapolitikkin í Evropeiska Samveldisbankan, soleiðis at einstøku londini, sum luttaka í samstarvinum um evruna, ikki hava nevnivert sjálvstýri á pengapolitiska økinum. Hetta - saman við bondunum, sum eru løgd á fíggjarpolitikkin hjá luttakaralondunum - er gjørt júst fyri at gera tað lættari hjá politikkarum at standa ímóti dagliga trýstinum frá áhugabólkum um til dømis rentulækkingar, gjaldoyraniðurskrivingar og líknandi.

**Hevur skattatrýstið ongan týdning?**

Í bókini hjá Charles Jones ”Introduction to Economic Growth”, sum verður brúkt sum grundbók um búskaparvøkstur á lærdum háskúlum líka frá Harvard til Roskilde, ber als ikki til at finna orð sum skattatrýst ella skattaprosent. Orsøkin er ikki, at búskaparfrøðingar einki vita um hetta evnið. Sera nógvar kanningar eru gjørdar av sambandinum millum skattatrýst og búskaparvøkstur. Orsøkin er, at generella niðurstøðan er, at tað er einki einvíst samband millum skattatrýst og búskaparvøkstur. Alt eftir hvørji lond og hvørji tíðarskeið vera tikin við í hagtalsliga grundarlagið, ber til at finna eitt positivt ella negativt samband millum skattatrýst og búskaparvøkstur.

Búskaparfrøðiliga granskingin hevur tikið hetta til eftirtektar og er ístaðin fyri farin at hella til eitt ástøði um, at einvíst samband finst millum búskaparvøkstur og hvussu skattakrónurnar verða brúktar, heldur enn hvussu nógvar tær eru. Eitt dømi er, at í ”Global Competitiveness Report 2002-2003”, sum raðfestir hvussu væl disponerað londini í heiminum eru fyri búskaparvøkstri, er støddin av almenna sektorinum tveitt burtur sum forklárandi ávirkan. Ístaðin er komið eitt ”samanvigað indeks fyri spill”, sum skal lýsa útbreiðsluna av spilli innanfyri tað almenna gjøgnum ”nepotismu og korruptión”. Indeksið er samansett av undirindeksum fyri: ”útbreiðsla av avlagandi almennum studningum”, ”alment álit á fíggjarliga reinlyndi hjá politikkarum” og ”burturveiting av almennum peningi”.

## Politiskt ábyrgdarøki

Framhaldandi broytingar í tøkni og sosialum virðum og siðvenjum gera, at tað alla tíðina er neyðugt at endurnýggja og útbyggja skilagóðar vinnuligar leikreglur eins og sosialt undirstøðukervi, ið styðjar undir marknaðirnar. Evnini hjá einum samfelag at røkja hesu uppgávu hevur stóra ávirkan á, hvussu atferðin er hjá fyritøkum og einstaklingum á marknaðunum og tí eisini, hvussu væl vinnuligu marknaðirnir virka. Hesar skipanir verða framleiddar í einari politiskari tilgongd, har tað í síðsta enda er politiska skipanin, ið tekur avgerðirnar. Í hvønn mun ein marknaðarbúskapur er førur fyri at skapa framhaldandi størri vælferð fyri borgararnar, er tí í stóran mun ein spurningur um politiskan førleika.

# Hvat loyvir vánaligum leikreglum?

Hví hava øll lond ikki væl skipaði bygnaðarlig viðurskifti, t.e. samfelagsligt undirstøðukervi, sum tilskundar búskaparvøkstur? Í diktaturstatum gera valdsharrarnir sjálvsagt sum teir vilja, og flestu teirra hugsa sjálvsagt mest um sína egnu vælferð, men í einum demokratiskum samfelag sum tí føroyska er tað politiska skipanin, við fólksliga valdum umboðum, sum ásetur vinnuligu leikreglurnar og samfelagsliga undirstøðukervið í heila tikið. Spurningurin er tí, hví úrslitið av politisku tilgongdini, har bygnaðarligu skipanirnar verða framleiddar, ikki altíð er til frama fyri endamálið um størst møguliga vælferð fyri borgaran?

## Almennar uppfatanir

Í síðsta enda er tað borgarin, sum ásetur leikreglurnar í samfelagnum, tí tað er borgarin sum velur, hvør skal mynda formligu politisku skipanina. Hetta viðførir sjálvsagt ikki, at semja er um, hvussu úrslitið av framleiðsluni í samfelagnum skal býtast. Men øll skuldu havt áhuga í, at vinnuligu leikreglurnar tilskundaðu til so høgan produktivitet og harvið til so nógva búskaparliga vælferð sum gjørligt. Fyri tí at trætast verður um, hvussu køkan skal býtast, so átti at borið til at fingið semju um at skipast skal so fyri, at køkan gerst so stór sum gjørligt.

Men í øllum heimsins londum sæst, at leikreglurnar í størri ella minni mun eru soleiðis, at produktiviteturin ikki er so stórur, sum hann kundi verið, og køkan tí ikki er so stór, sum hon kundi verið. Partvís skyldast hetta, at tað ikki altíð ber til at halda spurningarnar um støddina av køkuni og býtið av henni atskildar. Til dømis vilja allarflestu skattir, sum eru neyðugur fyri at fíggja eitt tiltak sum skal minka um ójavnar í býtinum av køkuni, samstundis minka um tilskundanina til produktivitetsøkingar. Men ofta verða leikreglur ásettar, sum viðføra minni tilskundan til produktivitet og samstundis gera býtið av køkuni meira ójavnt, enn tað var frammanundan.

Ein orsøk til, at hetta er so, er at finna í teim almennu uppfatanum av, hvussu búskapurin í tí einstaka landinum er háttaður. Í flestu førum eru tað ikki hugmyndir, men materiell áhugamál, sum beinleiðis stýra menniskjansligari atferð. Men tó hava uppfatanir av, hvussu heimurin er háttaður, sum í sínum lagi eru sprotnar burtur úr hugmyndum, ofta avgerandi týdning fyri, hvussu fólk halda, at teirra áhugamál best verða røkt.

Hesar almennu uppfatanir eru sostatt partur av grundarlagnum undir “fólksins vilja”, sum so aftur avger, hvørjar politiskar meiningar stýra landinum. Tí hava almennar uppfatanir avgerandi ávirkan á tær spælireglur, sum politiska skipanin ásetur fyri búskaparligum virksemi.

## Eginleikin at týða búskaparliga umhvørvið

Men um almennar uppfatanir hava so stóra ávirkan á førda politikkin, má tað vera av alstórum týdningi, at tær samsvara við veruleikan, t.e. at tær eru ein rættvísandi mynd av, hvussu búskapurin í veruleikanum er háttaður. Ein týdningarmikil spurningur er tí, hvussu tað ber til at almennar uppfatanir um búskaparliga veruleikan kunnu vera skeivar?

Fyrst og fremst nýtast almennar uppfatanir um búskaparlig viðurskifti ikki samsvara við búskaparliga veruleikan orsakað av, at borgararnir hava trupulleikar við at lesa burtur úr dagliga virkseminum, hvussu búskapurin er háttaður, og hvussu búskaparliga umhvørvið broytist.

Einstaklingar brúka betri ella verri formuleraðar myndlar til at tulka heimin rundan um seg. Hesir myndlar eru lutvíst úrslit av mentannarligum arvi, og lutvíst eru teir framkomnir gjøgnum tær royndir, sum einstaklingurin hevur gjørt í lokala búskaparliga umhvørvinum. Myndlarnar verða so

framhaldandi uppdateraðir gjøgnum árinini frá til dømis upplivingum í samband við arbeiði og frá tíðindum og øðrum í fjølmiðlum.

Men ein samfelagsbúskapur er í nógvum førum ein torgreidd skipan. Tí er meira ella minni ógjørligt at lesa burtur úr tí, sum borgarin sær í sínum dagliga virki í búskapinum, hvussu búskaparliga gongdin í samlaða búskapinum veruliga er, hvørji viðurskifti hava týdning ella ikki osfr. Hesin trupulleikin við at lesa, hvussu samfelagsbúskapurin er háttaður, førir til, at almennar uppfatanir um búskaparliga veruleikan kunnu vera skeivar.

Trupulleikin er tí, at einstaklingurin sum oftast ger sínar niðurstøður út frá manglandi vitan og við subjektivum myndlum av umhvørvinum, sum eru skeivir. Tann vitan og informatión, sum einstaklingurin fær um búskaparliga umhvørvið, er sum oftast ikki nóg umfatandi og nóg røtt til at hesir subjektivu myndlar av umheiminum verða rættaðir.

## Sosialur kapitalur

Sosialur kapitalur kann lýsast sum sosial sambond, sum ein einstaklingur, fyritøka ella annar aktørur til eina og hvørja tíð hevur til taks og kann hava álit á. Orðið sosialur kapitalur kemur frá at hesi sosialu sambond geva atgongd til tilfeingi, onnur ikki hava atgongd til. Atgongdin til hetta tilfeingi, til dømis informatión ella álit frá øðrum loyvir viðkomandi at fáa í lag ting, sum ikki høvdu borið til annars.

Hesin kapitalur er líkur almennum tilfeingi. Fyrimunirnir, ið hetta tilfeingið kann geva, kunnu ikki ognartakast av einstaklingum, men eru spjaddir millum øll, sum eru partur av hesum sosiala netinum. Av somu orsøk eru einstaklingar ikki av sær sjálvum tilskundaðir til at vera við til at økja um sosiala kapitalin. Tað vil siga at flestu sosialu net verða skapt sum óætlað fylgja av øðrum virksemi.

Vinnuligt virksemi er í stóran mun regulerað av forvæntningum um atferðina hjá øðrum. Forvæntningarnar stava frá einum felags forstáilsi um spælireglurnar og um straffin fyri at víkja frá teimum. Felags forstáilsi er eitt slag av sosialum kapitali, sum stavar frá, at álit verður uppbygt gjøgnum longri tíð og gjøgnum títt samstarv, sum gevur limunum møguleika fyri at gera metingar um, hvussu álítandi hinir eru til dømis í samband við at yvirhalda gjørdar avtalur.

Av hesum skilst, at sosialur kapitalur er ikki ein almennur vilji at samarbeiða, sum stavar frá felags virðum ella áhugamálum, men eitt net av sosialum sambondum, ið kann brúkast í vinnuligum virksemi, tað verið seg framleiðslu ella kradding.

## Søguligur bundinskapur

Formellar bygnaðarligar skipanir eru sjáldan bara skaptar út frá einum ynski um, at tær skulu vera so gagnligar sum gjørligt fyri vælferðina hjá miðal borgaranum. Heldur eru tær í størri ella minni mun speglingar av, hvat tænir seráhugamálunum hjá teimum, sum hava samráðingarstyrki til at hava ávirkan á skipanina av leikreglunum. Vinnuligar leikreglur, sum verða mentar gjøgnum søguligar hendingar ella gjøgnum beinleiðis politisk tiltøk, eru tí ikki neyðturviliga tær skilabestu, tá umræður at skapa grundarlag fyri menning av samlaðu búskaparligu virðisøkingini.

Ofta verður siðvenja ella ”søgulig rættindi” brúkt sum grundgeving fyri at verandi leikreglur ikki skulu broytast. Men tað verður bara hildið lív í eini siðvenju, um onkur hevur beinleiðis gagn av, at lív verður hildið í henni. Tann næstan heilagi týdningur, sum siðvenja gevur eini skipan, er tí sum oftast styrktur av materiellu áhugamálunum hjá teimum, sum vildu mist orsakað av nýskipan og nýskapan.

Í flestu førum finnast áhugabólkar, sum hava fyrimun av at aðrar leikreglur eru galdandi enn tær, ið skapa størst møguliga vælferð til miðal borgaran. Og hava áhugabólkarnir fyrst fingið avgerandi ávirkan á leikreglurnar, er sera trupult at fáa fokus yvir aftur á, hvat er best fyri vælferðina hjá brúkaranum. Tá verandi bygnaðarligu skipanir eru vorðnar partur av lívsgrundarlagnum undir verandi áhugabólkum, vilja hesir framhaldandi útinna lobby virksemi fyri at skipanirnar verða varðveittar. Tí eru royndir upp á kradding frá áhugabólkum við sterkum sosialum sambondum, ið hava sersømdir undir verandi skipanum, og sum tí eru ímóti broytingum, altíð ein partur av tilgongdini, har leikreglurnar verða ásettar.

## State capture

Hugmyndir um, hvussu samfelagsbúskapurin er háttaður, kunnu stava ymsa staðni frá. Men samfelagsliga ávirkanin stavar frá, at áhugabólkar, sum hugmyndin lýsir fyrimunarliga, taka hana til sín og miðvíst føra hana fram.

Áhugabólkar kunnu seta seg á tilgongdina, sum ásetur leikreglurnar á einhvørjum øki, um teir kunnu sannføra fólk um, at teir skulu hava sersømdir, ikki tí at sersømdirnar eru til teirra privatbúskaparliga fyrimun, men tí tær eru til samfelagsins besta. Ein týðandi partur av lobby virkseminum hjá áhugabólkum er tí at royna at fáa teirra hugmynd av veruleikanum at ávirka almennu uppfatanina av, hvussu heimurin sær út.

Um almennu uppfatanirnar eru til vildar, og teir hava nóg stóran sosialan kapital, ber í nøkrum førum til hjá einum ella fleiri áhugabólkum við nóg stórari íløgu í lobbyvirksemi ikki bara at ávirka ásetingina av vinnuligu leikreglunum, men heilt at flyta málsetningin í politisku tilgongdini frá endamálinum um at skapa størst møguliga vælferð til brúkaran til síni privatu áhugamál. Búskaparfrøðin nevnir hetta ”state capture”. Privatu áhugamálini stýra tá tilgongdini soleiðis, at politiskar avgerðir og reguleringar verða tiknar útfrá, hvat er til fyrimuns fyri teirra privatbúskaparligu áhugamál, heldur enn hvat er til fyrimuns fyri vælferðina hjá miðal borgaranum. Søguligur bundinskapur kann tá gera, at sera trupult er at fáa flutt fokus yvir aftur á endamálið um vælferð til miðal borgaran. Tey, sum hava hepni til at seta seg á tilgongdina, fáa nevniliga umframt privatbúskaparligan vinning eisini politiska ávirkan, sum kann brúkast til at skaffa sær privatbúskaparligan vinning eisini í framtíðini.

Eitt dømi er skattapolitikkurin. Valdið, sum er lagt til politisku myndugleikarnar at leggja skatt á borgararnar, er stórt, og tað sama er freistingin at brúka valdið til at skaffa sær politiskar fyrimunir. Til dømis kunnu politikkarar brúka skattapolitikkin til at stuðla útvaldar fyritøkur ella vinnur við serligum skattalættum og øðrum skattafrítøkum. Tað er tí einki løgið, at fyritøkur royna at seta seg á politisku avgerðirnar á hesum økinum. Og eydnast tað einum bólki at fáa sersømdir er sera trupult at fáa tær tiknar burtur aftur, tí sersømdirnar gera, at seráhugamálini hava stóran áhuga í at vera væl skipað í síni mótstøðu móti, at tær verða tiknar burtur aftur.

Eitt annað dømi er vinnupolitikkurin. Vælvirkandi marknaðarligt umhvørvi avhongur av, at nýggjar fyritøkur framhaldandi hava so góðar møguleikar sum gjørligt at koma inn á marknaðin. Um gáttirnar, sum nýggjar fyritøkur, ið ætla sær inn á ein marknað, skulu upp um fyri sleppa inn á marknaðin, verða gjørdar kunstiga høgar, fækkar talið av møguligum kappingarneytum á marknaðinum, og kappingin verður minni. Hetta er skaðiligt fyri produktivitetin og harvið vælferðina hjá borgarunum, men er til fyrimuns fyri tær fyritøkur, sum longu eru á marknaðinum. Hesar fyritøkur hava tí tilskundan til at royna at seta seg á vinnupolitikkin fyri at kunna ávirka møguleikan fyri atgongd til marknaðin. Og eydnast tað áhugabólkunum at forða fyri atgongd til marknaðin, skapar hetta ein væl samansjóðaðan áhugabólk, sum roynir at forða fyri, at gáttin inn á marknaðin verður lækkað aftur.

# Er samband millum náttúruríkidømi og state capture?

## Ein signing

Til at reka vinnuligt virksemi í eini tilfeingisvinnu, t.e. til dømis fiskivinnu og oljuvinnu, krevjast tríggir framleiðslumiðlar, nevniliga arbeiðsmegi, kapitalur, og náttúrutilfeingi. Vinna í fríari kapping forrentar allar tríggjar framleiðslumiðlar.

Stóri fyrimunurin við náttúrutilfeingi er, at avkastið av náttúrutilfeinginum sjálvum, t.e. tilfeingisrentan, er arbeiðsfrí inntøka til eigaran. Støddin á tilfeingisrentuni er ymisk millum vinnur. Tilfeingisrentan í oljuútvinning er ofta stór, ofta upp til 80 prosent av framleiðsluvirðinum, nakað minni í útvinning av málmi, og uppaftur minni í fiskiskapi, har tilfeingisrentan kann vera umleið ein triðing av framleiðsluvirðinum. Hetta kemst av at tað generelt krevur størri nýtslu av framleiðslumiðlum at fiska fyri eina krónu enn at grava málm fyri eina krónu, sum aftur er dýrari enn at pumpa olju fyri eina krónu upp úr undirgrundini.

Um landið hevur ognarrættin til tilfeingið og krevur inn avkastið av tilfeinginum, til dømis við at selja tilfeingið á einum fríum marknaði, gevur tilfeingið sostatt eina eyka inntøku til landshúsarhaldið umframt vanligu inntøkurnar frá skatti og avgjøldum. Hetta skapar møguleikar fyri at fíggja skilagóðar íløgur, til dømis í útbúgving, og skattalættar. Stórt náttúruríkidømi skuldi tí verið ein signing fyri eitt land.

## …ella hvat?

Serliga síðan seinna heimsbardaga hava lond uttan nakað serligt av náttúruríkidømi verið at finna millum heimsins ríkastu lond. Til dømis eru Hong Kong, Japan, Luksembourg, Singapore og Sveits øll millum heimsins ríkastu lond, og tey eru ikki vorðin rík orsakað av stórum náttúruríkidømi.

Empiriskar kanningar, byrjaðar av Jeffrey Sachs og Andrew Warner í 1995, hava funnið fram til, at týðiligt samband er millum búskaparvøkstur og inntøkustøðið á aðrari síðuni, og hvussu stórt náttúruríkidømi eitt land hevur á hinari síðuni. Núverandi semja millum granskarar og aðrar eygleiðarar er, at stórt náttúruríkidømi oftast er ein vanlukka heldur enn ein signing, tí nógvar kanningar dokumenterað, at lond við stórum náttúruríkidømi í meðal hava havt lægri búskaparvøkstur síðan seinna heimsbardaga enn lond við lítlum ella ongum náttúruríkidømi.

## Hálendsk sjúka

Tá gass varð funnið í hálendsku undirgrundini seinast í 1950unum og fyrst í 1960unum, og útflutningurin av gassi tók dik á seg, øktist virðið á hálendska gjaldoyranum munandi. Hetta viðførdi, at fyritøkur í øðrum úflutningsvinnum komu í stórar trupulleikar. Fyribrigdið hevur síðan verið kallað hálendsk sjúka. Ikki er neyðugt at krónuvirðið økist, tí tað er eisini hálendsk sjúka, um knappliga ríkidømið frá tilfeinginum viðførir, at lønarlagið í landinum gerst so høgt, at fyritøkur í øðrum útflutningsvinnum fáa trupult við at kappast um arbeiðsmegina. Tí kann hálendsk sjúka eisini koma fyri í londum, sum ikki hava egið gjaldoyra, til dømis í Føroyum og Grønlandi.

Ein annar trupulleiki kann vera, at stórt náttúruríkidømi viðførir, at tilfeingisvinnan gerst ein stórur partur av samlaða vinnulívinum. Vinnubygnaðurin verður tá soleiðis, at gjaldoyraframleiðslan, t.e. útflutningsframleiðslan, í mestan mun fer fram sum gagnnýtsla av náttúrutilfeinginum. Tí verða stutttíðarsveiggini í búskapinum í stóran mun heft at gongdini í tilfeingisvinnuni. Um

inntøkuskapanin í tilfeingisvinnuni er óstøðug, skapar hetta so aftur eitt óstøðugt vinnuligt umhvørvi, sum kann minka um íløgustøðið og harvið minka um inntøkustøðið.

Ein triði trupulleiki er væntandi útbúgving í londum við stórum náttúrutilfeingi. Tvørtur um landamørk er prosentparturin av fólkinum sum til eina og hvørja tíð er í ferð við útbúgving, minni, jú størri náttúruríkidømi í landinum er. Forkláringin er helst, at tilfeingisvinnur ofta krevja lutfalsliga nógva ófaklærda arbeiðsmegi. Nógv arbeiðspláss í tilfeingisvinnuni til ófaklærd minkar privatu og almennu tilskundanina til at gera íløgur í útbúgving.

Men orsakað av tøkniligu gongdini kann væntast, at eftirspurningurin eftir ófaklærdari arbeiðsmegi verður minni og minni í framtíðini, bæði í tilfeingisvinnum og øðrum vinnum. Hetta er ein trupulleiki, bæði fyri ófaklærdu arbeiðsmegina sjálva og fyri samlaða búskapin, tí mótstøðan móti neyðugu vinnuligu tillagingini veksur, so hvørt sum møguleikarnir hjá ófaklærdu arbeiðsmegini fækka.

**Tilfeingisrenta í Føroyum.**

Tilfeingisrenta er avkast av náttúruríkidømi, tað vil siga tilfeingi, sum ikki verður framleitt av arbeiðsmegi og kapitali. Til dømis hevur málmur í jørðini búskaparligt virði, hóast eingin arbeiðsmegi ella kapitalur verður brúktur til at framleiða hann. Sjálvsagt er neyðugt við arbeiðsmegi og kapitali fyri at fáa málmin úr jørðini, men sjálvan málmin hevur náttúran skapt.

Størsta tilfeingisrentan í Føroyum fæst úr fiskastovnunum. Fiskurin hevur stórt búskaparligt virði, longu tá hann svimur í sjónum. Haraftrat geva firðirnir, sum kunnu brúkast til aling, tilfeingisrentu.

Skilt á henda hátt er ríkisveitingin eisini tilfeingisrenta sæð frá føroyskum sjónarhorni. Donsk arbeiðsmegi og kapitalur eru brúkt til at framleiða tað búskaparliga virðið sum ríkisveitingin er, men eingin føroysk arbeiðsmegi ella kapitalur verður brúktur til at framleiða tað búskaparliga virðið, sum ríkisveitingin er. Á henda hátt er ríkisveitingin at meta við eitt nú tilfeingisrentu frá olju.

## Dansur um gullkálvin

Hóast hagfrøðiligt samband er millum náttúrutilfeingi og lágan búskaparvøkstur, so finnast eisini dømi um at náttúrutilfeingi hevur verið ein búskaparlig signing. Fyri eitt land sum Sierra Leone hevur stóra diamantríkidømið verið ein vanlukka, men Botswana, sum eisini hevur stórt diamantríkidømi, hevur havt størsta búskaparvøkstur í heiminum seinastu 40 árini. Í Venezuela hevur olja verið orsøk til framhaldandi búskaparligar trupulleikar. Noreg er hinvegin vorðið eitt av allarríkastu londum í heiminum orsakað av oljuríkidøminum í norsku undirgrundini. Tað gevur ábendingar um, at onnur meira grundleggjandi viðurskifti eru, sum hava týdning. Og upplagda forkláringin er munir í umsitingini av náttúrutilfeinginum.

Í Noreg og Botswana taka myndugleikarnir ognarrættin hjá almenninginum til tilfeingið fyri fult. Teir krevja inn tilfeingisrentuna frá ávikavist olju og diamantum og goyma hana til seinni ættarlið ella brúka hana til at fíggja íløgur í útbúgving, vegir og tunlar osfr. Í Sierra Leone stóðst hinvegin borgarakríggj um tilfeingisrentuna, og eisini í Venezuela hevur tilfeingisrentan frá oljuvinnuni verið orsøk til mikið stríð heldur enn gagn.

Sierra Leone og Venezuela eru ekstrem dømi, men fyribrigdið er alment galdandi. At eitt land eigur stórt náttúrutilfeingi viðførir ofta kradding. Einstaklingar og fyritøkur royna at ávirka politikkararnar til at taka avgerðir á økinum, sum eru til egnan fyrimun. Málsetningurin er at ganga rundan um ella heilt at oyðileggja kapping á vinnuliga marknaðinum fyri at fáa fatur í

tilfeingisrentuni. Teimum kann til dømis eydnast at fáa framíhjárætt ella beinleiðis ognarrætt til landsogn, so sum olju, mineralir ella fiskastovnar.

Á henda hátt stendst kapping millum fyritøkur og einstaklingar um politiskar tænastur heldur enn kapping um produktiva framleiðslu. Møguleikar fyri vinningi gjøgnum kradding draga soleiðis vinnulívsfólk burtur frá produktivum virksemi. Haraftrat verður býtið av framleiðslumiðlunum millum ymsu vinnurnar í landinum avlagað, tí arbeiðsmegi og kapitalur verða í ov stóran mun leidd yvir í tilfeingisvinnurnar, har møguleiki er fyri at fáa lut í avkastinum frá náttúrutilfeinginum uttan gjald.

Dynamikkurin í politisku tilgongdini kann haraftrat gera, at tað gerst sera trupult at koma burtur úr hesi støðuni aftur. Ein náttúrlig avleiðing av royndunum hjá privatum at ogna sær tilfeingi er, at lobbyir verða uppbygdar í og rundan um tilfeingisvinnurnar. Er vinnuliga undirstøðukervi undir tilfeingisvinnuni ikki nóg sterkt frá byrjan ella einaferð viknar, soleiðis at áhugabólkar kunnu seta seg á politikkin á økinum, vilja áhugabólkarnir sjálvandi ikki sjálvboði geva serrættindini frá sær aftur. Teir vilja tí virka móti øllum royndum at bøta um vinnuligu leikreglurnar fyri tilfeingisvinnurnar. Kradding er tí bæði eitt úrslit av og ein orsøk til, at vinnuligir marknaðir virka illa.

## Virðismeting av náttúruríkidømi

Stórt náttúruríkidømi saman við vánaligum skipanum til umsiting av ríkidøminum, er ein beinleiðis innbjóðing til kradding av ymsum slag. Í tann mun náttúrutilfeingi verður tillutað fyri minni enn marknaðarprís og á henda hátt opnar fyri dysti um tilfeingisrentuna, er ikki annað væntandi enn at lond við stórum náttúruríkidømi eru meira útsett fyri kradding enn onnur lond.

Søguligu royndirnar vísa eisini, at tað er ikki, hvørt eitt land hevur stórt náttúruríkidømi ella ikki í sær sjálvum, sum hevur ávirkan á inntøkustøðið. Tað er altso ikki hálendsk sjúka, sum er orsøkin til at náttúruríkidømi kann vera skaðiligt fyri inntøkustøði. Munirnir í inntøkustøði millum lond við stórum náttúruríkidømi eru serliga orsakaðir av munum í, hvussu tilfeingisrentan verður umsitin. Náttúruríkidømi er bara ein vansi fyri lond við vánaligari umsiting av ríkidøminum.

Avbjóðingin er sostatt politisk, nevniliga røtt umsiting av náttúruríkidøminum. Náttúrutilfeingið má umsitast eftir marknaðarligum leisti. Við hesum meinast, at tað almenna sum eigari av tilfeinginum má syrgja fyri at krevja inn tilfeingisrentuna, soleiðis at hon ikki verður løgd út á vinnupolitiska marknaðin at dystast um. Atgongd til almenna ogn av náttúrutilfeingi má regulerast so effektivt sum gjørligt – og tað vil siga við marknaðarprísi.

# Hví eru vit so rík í Føroyum?

Síðan seinna heimsbardaga er vælferðin hjá føroyska borgaranum økt munandi, bæði í søguligum samanhangi og í mun til onnur lond. Í dag er inntøkustøðið í Føroyum umleið 80 prosent av tí danska og somuleiðis umleið 80 prosent av tí íslendska. Samanborið við nógv onnur lond í heiminum er hetta høgt inntøkustøði.

Sum víst á fleiri ferðir frammanfyri er tað produktivitetsvøkstur gjøgnum nógv ár, sum er grundarlagið undir øktari vælferð, og sum eisini hevur gjørt okkum so rík. Men hvar er produktivitetsvøksturin í Føroyum komin frá?

## Innflutt tøkni…

Fyrst og fremst skyldast høga inntøkustøðið í Føroyum, at vit leingi hava havt eina stóra íløgukvotu, bæði í fólk og kapital. Tí er kapitalapparatið per íbúgva stórt, og útbúgvingarstøðið er næstan líka høgt sum í hinum Norðurlondunum. Haraftrat er tað soleiðis í dag, at stórur partur av framleiðsluni brúkar mest framkomnu tøknina. Men søgan vísir at tað er eingin sjálvfylgja, at vit brúka nútímans tøkni.

Stórt sæð øll nýggj tøkni og harvið flest allir møguleikar fyri produktivitetsøkingum eru komnir til okkum uttanífrá. Vinnumenningin er hend gjøgnum herming eftir framleiðsluni í teim londum, sum føroyingar hava havt samskifti við, fyrst nógv seinkað, men so líðandi við minni og minni seinking. Hetta mynstrið er fremsta eyðkenni í føroyskari vinnusøgu.

Fiskaveiðisøga landsins er eitt sera gott dømi. Í síðu 188 í triðja bindi av “Fiskivinna og Fiskivinnumál” skrivar Erlendur Patursson soleiðis:

> “Í allari søgu skipsfiskiveiðinnar hevur tað verið so, at fiskiveiðin hevur fingið flest allar útgerðarvørur úr útlondum. Tað nógva av tí, sum um borð í skipini er komið, hevur verið av útlendskum uppruna…allur skipsútbúnaður, veiðireiðskapur, tilfar til segl, skipsvistir og hvørt av sínum…Sjálv skipini og motorarnir í teimum vórðu keypt í útlondum.”

Bretsk skip byrjaðu havfiskiskap undir Føroyum longu umleið ár 1800, og um miðja øldina var fiskiskapurin rættuliga umfatandi. Nakrir føroyingar sigldu við hesum sluppum, og lærdu á henda hátt sjómanskap. Men bara fáar og oftast miseydnaðar royndir vórðu gjørdar at gera út føroysk skip til fiskiskap.

Tá kongaligi einahandilin verður avtikin í 1856 fara føroyskir handilsmenn at keypa sær skip úr Danmark ella Bretlandi at føra farm. Skipararnir vóru sum oftast danir, tí eingin skiparaskúli var í Føroyum tá. Royndir verða gjørdar at brúka skipini til fiskiskap eisini, men kunnleikin til havfiskiskap er lítil, so úrslitini eru misjøvn. Men hóast alt veksur hugurin at royna seg í nýggju vinnuni, og fyrstu sluppirnar til fiskiskap verða keyptar til landið í 1870unum. Seinastu tríati árini av 1800 talinum gongur skjótt framá við havfiskiskapinum, men hóast tað, so var útróðrarveiðan framvegis líka stór sum skipsveiðan so seint sum um ár 1900.

Vit hava sostatt altíð verið eftirbátur á flestu økjum innanfyri vinnuliga framleiðslu. Frá byrjan var tøknin, føroyingar brúktu í fiskiskapi, ógvuliga aftarliga samanborið við londini rundan um okkum. Føroyingar keyptu skip, sum onnur ikki brúktu longur. Hetta hendi við sluppunum seinast í 19. øld og fyrst í 20. øld, og aftur við skipunum, sum vóru keypt eftir seinna heimskríggj.

Henda søgan vísir tó eisini, at stóra opið fram til tøkniliga markið, sum samstundis hevur flutt seg skjótt frameftir, hevur givið møguleikar fyri ógvuliga stórum produktivitetsøkingum í fiskiskapi.

Men tað er ikki fyrr enn aftan á seinna heimsbardaga at produktiviteturin veruliga byrjar at taka dik á seg. Serliga vóru síðutrolararnir eitt stórt tøkniligt lop frameftir í mun til sluppfiskiskapin. Og líka síðan er føroyskur fiskiskapur vorðin meira og meira tøkniliga framkomin, eisini samanborið við onnur lond, soleiðis at í hvussu so er partar av fiskiflotanum í dag hava millum mest framkomnu fiskiskip í heiminum.

Hetta hevur so aftur gjørt tað møguligt at minka munandi um nøgdina av arbeiðsmegi, ið krevst á sjónum, soleiðis at meira arbeiðsmegi verður tøk at arbeiða í heimamarknaðarvinnum. Samstundis hevur produktivitetsvøkstur og nýggj tøkni gjørt tað møguligt framhaldandi at útbyggja arbeiðsdeilingina. Nýggjar vinnur eru vaksnar fram, og gamlar vinnur hava endurnýggja seg. Hetta hevur økt munandi um støddina á heimamarknaðinum. Úrslitið er, at á heimamarknaðinum verða í dag keyptar og seldar vørur og tænastur í nøgdum og úrvali, sum eingin hevði hugsað sær fyri fáum árum síðan.

## …og samfelagsligt undirstøðukervi

Tøknilig frambrot skapa vinnuligar møguleikar, men tey tryggja ikki, at møguleikarnir verða brúktir. So hvørt tøknin gerst alsamt meira framkomin og samfelagið gerst alt meira fløkt, er neyðugt við meira útbygdum samfelagsligum undirstøðukervi. Fyri at vinnulívið og samfelagið sum heild skulu kunna og vilja taka við nýggju møguleikunum er neyðugt, at samfelagsliga undirstøðukervið er opið fyri og eggjar til, at tøknin verður gagnnýtt á skilagóðan hátt. Tað vil siga at sæð frá politiskari síðu er samfelagsbúskaparlig menning ein spurningur um uppbygging og tillaging av samfelagsligum undirstøðukervi, ið stuðlar undir nýtslu av tøkni til at økja produktivitetin í vinnuligari framleiðslu.

Hetta ger seg meira og meira galdandi. Til ein fjølbroyttan nútímans marknaðarbúskap krevst eitt ótal av skipanum, sum styðja undir vinnuligt virksemi. Fyri at skapa møguleikar fyri framhaldandi útbygging av arbeiðsdeilingini er neyðugt við tænastum, sum tað ikki ber til at skapa ein vinnuligan marknað fyri.

Til dømis eru væl skipaði ognarrættindi er avgerandi tá umræður viljan at gera produktivitetsøkjandi íløgur, og undirvísingarverkið avgerandi tátturin, tá førleikanum at taka við nýggjum tøkniligum møguleikum umræður.

Aftrat hesum grundleggjandi skipanum er neyðugt við vinnuligum eftirliti so sum Kappingarráði og Fjarskiftiseftirliti, fysiskum undirstøðukervi (samferðslukervi, el- og telekaðalum og líknandi), sosialum trygdarskipanum, og góðum og viðurkendum skipanum til viðgerð av trætum.

At undirstøðukervið styðjar undir vinnuliga produktivitetin í samfelagnum er ikki ein sjálvfylgja. Til tess krevst bæði politiskur vilji og umsitingarligur førleiki at umsita, endurskoða og útbyggja allar hesar skipanir. Tí samstundis sum tøknin verður betri og betri, broytir hon eisini fyritreytirnar í samfelagnum. Ofta royna tey, sum hava politisku maktina og sum vildu mist við broytingum, at áseta leikreglur, sum forða fyri at nýggju tøkniligu møguleikarnir verða brúktir, tí tey eru bangin fyri at vinnuliga tillagingin fer at forskjóta búskaparligu og politisku maktjavnvágina burtur frá teimum sjálvum.

Til dømis byrjaðu bretar við sluppfiskiskapi longu umleið ár 1800. Alt sum skuldi til at innføra sluppfiskiskap í Føroyum var so mikið av uppspardum kapitali, at skipini kundu keypast og so mikið av útbúgving, at førleikin at føra tey var til staðar. Til hetta kravdist ikki meira enn grundleggjandi ognarrættur og ein maður við skipsføraraprógvi. At føroyingar hóast hetta vóru 70 ár aftanfyri skyldast helst í stóran mun vinnuligu leikreglunum hesi árini, einamest kongaliga einahandlinum og líknandi forðingum fyri vinnuligum virksemi.

Men í dag er føroyska samfelagið rættuliga væl fyri við samfelagsligum undirstøðukervi. Samstundis sum føroyingar hava verið dugnaligir at taka við nýggjum framleiðslumøguleikum í fylgi við frambrotini í tøkni seinastu nógvu árini, so hava teir eisini verið dugnaligir at gera umskipanir í samfelagsligum undirstøðukervi. Fysiska undirstøðukervið er rættuliga framkomið, almenni bygnaðurin virkar nøkulunda líka væl sum í londunum rundan um okkum, útbúgvingarstøðið er ikki so langt undir tí í grannalondunum osfr., um enn sjálvandi summi øki kundu verið betri fyri.

Flestu av hesum skipanum eru innfluttar úr Keypmannahavn. Viðhvørt kann vera, at beinleiðis umsettar danskar lógir og skipanir ikki passa so væl til føroysk viðurskifti. Men hinvegin er tað líka sannlíkt, at lítið ella einki skil hevði verið á, um føroyingar skuldu uppbygt alt samfelagsliga undirstøðukervið frá grundini, uttan at hava meira ella minni lidnar útlendskar skipanir at styðja seg til. At møguleikar hava verið fyri skjótari tillaging av tøkni, framleiðslu og vinnubygnaði hevur samstundis sett stór krøv um nógvar og skjótar tillagingar í samfelagsliga undirstøðukervinum fyri at loyva samfelagnum at brúka møguleikarnar skilagott. Tí hevur tað verið ein fyrimunur at kunna innflyta lidnar skipanir úr Danmark.

## Førleiki at læra

Orsakað av stórum samskifti við umheimin hava vit havt møguleika fyri at tikið við nógvari av tí framleiðslutøkni, sum verður uppfunnin aðrastaðni. Somuleiðis er meginparturin av bygnaðarligu skipanunum innfluttur úr Danmark. Hetta sigur okkum, at landafrøðiliga støða Føroya hevur havt stóran týdning. Tað eru sera fá frambrot í tøkni ella bygnaðarligum viðurskiftum, sum vit sjálvi hava megnað at uppfinna. Møguleikar og dugnaskap til at taka við tí, sum kemur uttanífrá, hevur altíð havt og hevur enn sera stóran týdning.

Eyðsæð er tí, at um Føroyar vóru 18 smáar oyggjar uttan fyri Burma heldur enn uttanfyri Skandinavia, høvdu møguleikarnir gjøgnum søguna fyri at fingið atgongd til nýggjastu tøknina ikki verið teir somu, á sama hátt sum tey bygnaðarligu viðurskiftini viðvíkjandi til dømis almennum bygnaði og politiskari stýriskipan ikki høvdu verið tey, sum tey eru í dag. So um okkara landafrøðiliga støða sum pinkulítið oyggjaland í Norðuratlantshavi er ein vansi, hevði vansin verið nógv størri, um vit vóru eitt pinkulítið oyggjaland í til dømis Indiska havinum.

Kjarnin í viðgerðina omanfyri er tó ikki, at føroyingar ikki hava uppfunnið nakað serligt av framleiðslutøkni ella samfelagsligum undirstøðukervi sjálvir. Føroyingar eru 0,001 prosent av heimsins fólkatali, so tað er eyðvitað avmarkað, hvussu nógv kollveltandi tøknilig frambrot kunnu koma úr Føroyum. Og samfelagsligar skipanir eru ofta ikki uppfunnar av nøkrum. Eingin hevur uppfunnið ognarrættin ella skúlaverkið. Slíkar skipanir eru heldur spakuliga vaksnar fram, næstan á sama hátt sum føroyska ella danska málið eru vaksin fram uttan at vera framleidd av nøkrum ávísum.

Kjarnin er, at føroyingar hava havt førleikan til at taka til sín ta tøkni og tær hugmyndir um innrætting av samfelagnum, sum kemur inn á okkum. Hetta er orsøkin til lutfalsliga høga inntøkustøðið í Føroyum. Og virðið á hesum førleika hevur ongantíð verið so stórt sum nú, tá alheimsgerðin gevur møguleikar fyri at finna tøknilig frambrot og hugmyndir um samfelagsviðurskifti, ikki bara frá okkara nærmastu grannum, men úr øllum heimsins heraðshornum.

# Hví eru vit ikki líka rík sum hini?

## Løtt atgongd til vinnupolitiskan marknað

Tað er aloftast manglandi kappingarføri á vinnuliga marknaðinum, sum er avgerandi fyri, um ein fyritøka sleppur inn á vinnupolitiska marknaðin ella ikki. Eru áhugabólkarnir, sum koma í klemmu av at ein fyritøka ikki er kappingarfør á vinnuliga marknaðinum, nóg sterkir, ber til at fáa politikararnar til at taka fyritøkuna upp á vinnupolitiska marknaðinum. Til dømis er tað ein roynd at flyta virksemi frá vinnuliga marknaðinum, har man ikki hevur megnað at vera kappingarførur, til vinnupolitiska marknaðin, tá virkisleiðarar fara í fjølmiðlarnar at kæra sína neyð.

Hetta, at nógv vinnulig viðurskifti viðvíkjandi, hvørjar fyritøkur eru til og hvørjar ikki, verða avgjørd á vinnupolitiska marknaðinum heldur enn á vinnuliga marknaðinum, gongur sostatt beint móti einum málsetningi um, at tað skal verða produktivitetur í framleiðslu, sum skal avgera, hvørjar fyritøkur eru kappingarførar og harvið lívbærar.

Hví sleppa fyritøkur so at troðka seg framat á vinnupolitiska marknaðinum, tá tær ikki klára seg á vinnuliga marknaðinum? Tað sleppa tær, um tær klára at sannføra almenningin um, at tað er skaðiligt fyri samfelagið, um kappingarførið einsamalt avgerð, um fyritøkan skal liva ella ikki. Fyritøkan kann vísa á, at arbeiðsloysið í júst hesi bygdini verður stórt, at útflutningsvirðið minkar ella líknandi.

Ein stórur trupulleiki er, at tá ein fyritøka fyrst er komin inn á vinnupolitiska marknaðin, er tað sera trupult at fáa hana út aftur á vinnuliga marknaðin. Trýstið á leiðslu og arbeiðsfólk um at tillaga seg fyri at vera kappingarfør er nógv minni inni á vinnupolitiska marknaðinum, og tí hava hesi stóran áhuga í at sleppa at verða verandi har. Tey vilja tí gera stórt lobbyarbeiði fyri ikki at vera koyrd útaftur á vinnuliga marknaðin. Tí er tað sjálvdan soleiðis, at ein fyritøka kann takast inn á vinnupolitiska marknaðin fyri eitt styttri tíðarskeið, og so fer hon sjálvboðin útaftur á vinnuliga marknaðin.

## "Í samráð við vinnuna"

Í Føroyum er tað ein stórur trupulleiki, at ofta verður lurtað alt ov nógv eftir, hvat verandi aktørar á einum marknaði hava at siga um ymisk viðurskifti. Verandi aktørar hava sjálvsagt virðismikla vitan um marknaðin, og haraftrat hava teir ein demokratiskan rætt til at leggja síni sjónarmið fram. Men minnast má til, at hesir aktørar arbeiða fyrst og fremst fyri egin áhugamál.

Viðvíkjandi kapping hava verandi aktørar áhuga í, at teirra fyritøkur fáa fyrimunir í mun til møguligar nýggjar kappingarneytar á marknaðinum, ella beinleiðis at forða verður fyri, at nýggir kappingarneytar koma inn á marknaðin. Vinnuligu aktørarnir royna tí sjálvsagt at minka hóttanina frá møguligum nýggjum kappingarneytum so nógv sum gjørligt. At ráðføra seg ov nógv við "vinnuna", tað vil siga verandi aktørar á marknaðinum, vil tí viðføra, at myndugleikarnir seta forðingar í vegin fyri nýggjum aktørum á marknaðinum, soleiðis at kappingin verður minni, enn hon annars hevði verið.

Í tilfeingisvinnunum hava fyritøkurnar áhuga í, at treytirnar fyri nýtslu av almenna tilfeinginum eru so lagaligar sum gjørligt, tað vil siga at aktørarnir fáa tilfeingið fyri einki, at fiskidagatalið verður sett so høgt sum gjørligt, at loyvt er at hava ríkiligt av alifiski á firðunum osfr. At verandi aktørar í vinnuni hava ov stóra ávirkan á almennu umsitingina av tilfeinginum viðførir tí, at tilfeingisrentan verður latin verandi fyritøkum heldur enn innkravd til eigaran av tilfeinginum, og at stórur vandi er fyri ov nógvum fiskidøgum, ov intensivari aling osfr.

## Ressource curse

### *Statistiska illusjónin…*

At seráhugamálini í fiskivinnuni hava eydnuna við sær í sínum lobbyarbeiði mótvegis almenninginum skyldast fyri stóran part, at tær almennu uppfatanir, sum vegleiða førda politikkin á økinum eru skeivar og verða ikki rættaðar, heldur tvørturímóti. Almenna uppfatanin av, hvussu føroyski búskapurin er háttaður, gevur grundarlag fyri skeivum politiskum avgerðum um, hvørjar leikreglur skulu vera galdandi fyri vinnuligt virksemi. Tað er hetta, sum hevur gjørt tað møguligt hjá seráhugamálunum í útflutningsvinnunum at seta seg á vinnupolitikkin í Føroyum.

Allarflestu føroyingar eru frá barnsbeinið upplærdir í tí fatan, at “fiskivinnan er beinið, búskapurin stendur á”. Og alivinnan sleppur upp í part, tí tað er jú eisini fiskur og útflutningur. Orsakað av, at borgararnir hava trupulleikar við at týða hendingarnar í búskaparliga umhvørvinum, er hetta myndin flestu føroyingar framvegis hava av búskapinum. Um onkur er skeptiskur, so verður henda uppfatan uppafturprentað, hvørja ferð fiskaprísir ella nøgdir fara upp ella niður, og inntøkuskapanin fer sama veg.

**Er illusjónin verri enn aðrastaðni?**

Myndin niðanfyri vísir sveiggini í bruttotjóðarinntøkuni um ein langtíðartrend fyri ávikavist Danmark og Føroyar.




Eitt vanligt konjuktursveiggj í Føroyum er lutfalsliga tríggjar ferðir so stórt sum í Danmark, - ávikavist 1,77 og 0,6 prosent av BTÚ - sum sæð í europeiskum høpi hevur rættuliga stór

konjuktursveiggj. Parturin av íbúgvunum í Føroyum, sum verða beinleiðis ávirkaðir av upp- og niðurgongdum í fiskivinnuni er av somu orsøk nógv størri enn í øðrum londum. Tað er tí ikki so løgið, at í Føroyum standa broytingar í inntøkuskapanini í fiskivinnuni sera týðiliga fyri fólki, og at tær grugga myndina av, hvat hevur týdning fyri langtíðargongdina.

Av tí at flestu konjuktursveiggj í Føroyum standast av sveiggjum í inntøkuskapanini í útflutningsvinnunum, og tí at sveiggini í Føroyum eru sera stór, er tað náttúrligt, at niðurstøðan hjá flestu føroyingum er, at jú fleiri skip og flakavirkir og arbeiðspláss í fiskivinnuni, og jú fleiri aliringar, tess ríkari er land og fólk. Yvir styttri tíðarskeið er niðurstøðan eisini ofta púra røtt.

Men sæð yvir longri tíðarskeið er veruleikin ein annar. Meðan upp ella niðurgongd í fiskivinnuni eru sera týðandi fyri stuttíðargongdina í føroyska búskapinum verður grundleggjandi vælferðarstøðið avgjørt aðrastaðni. Drívmegin aftanfyri framhaldandi hækkandi vælferðarstøði í Føroyum er nevniliga at finna í framhaldandi hækkandi produktiviteti. Hetta gevur møguleika fyri at fiskivinnan og allar aðrar vinnur verða riknar við alsamt minni arbeiðsmegi. Tað gevur størri útboð av arbeiðsmegi at framleiða aðrar vørur og tænastur, bæði til útflutnings og til heimamarknaðin.

Myndin niðanfyri vísir til dømis, at hóast framleiðsluvirðið per íbúgva og harvið inntøkustøðið er meira enn tvífaldað seinastu fjøruti árini, so er parturin hjá fiskivinnuni av bruttofaktorinntøkuni minkaður umleið 10 prosentstig, úr 32-33 prosentum fyrst í 1960unum niður í 22-23 prosent í dag. Tað vil siga, at sæð yvir longri tíðarskeið er ikki neyðugt við fleiri størvum í fiskivinnuni fyri at økja um inntøkuskapanina í landinum, heldur tvørturímóti.

At parturin av framleiðsluorkuni í samfelagnum sum verður brúktur í fiskivinnuni minkar stendst av, at framhaldandi produktivitetsvøksturin í fiskivinnuni ger, at neyðugt er við alsamt minni arbeiðsmegi fyri at skapa tað framleiðsluvirði sum skal til fyri at gjalda fyri føroyska innflutningin. Sostatt er tað orsakað av stórum produktivitetsøkingum í fiskivinnuni – og tí gleðiligt heldur enn keðiligt, at størri og størri partur av arbeiðsmegini verður tøkur at framleiða vørur og tænastur í øðrum vinnum.




Í veruleikanum er tað hugstoytt, at partur fiskivinnunnar av bruttofaktorinntøkuni framvegis er so stórur. Hetta merkir nevniliga, at tilfeingisframleiðsla er líka stórur partur av føroyska búskapinum í 2004, sum tilfeingisframleiðsla, nevniliga landbúnaðarframleiðsla, var av danska búskapinum tíðarskeiðið beint undan fyrra heimsbardaga.

## *…gevur pláss fyri politiskari ávirkan…*

Statistiska illusjónin gevur áhugabólkunum í útflutningsvinnunum og serliga í fiskivinnuni góðar møguleikar fyri lobby virksemi, tað vil siga fyri at ávirka almennar uppfatanir av, hvussu búskapurin er háttaður. Tað einasta tey skulu sannføra veljaran um er, at av tí at "fiskivinnan er beinið, búskapurin stendur á", er tað alneyðugt at tryggja, at vit hava ríkiligt av skipum, sjómonnum, flakafólki, alifyritøkum, sláturvirkjum osfr. Um neyðugt má hetta tryggjast við studningum, bæði við generellum studningum, so sum skattafrádrátti og alment tryggjaðari minstuløn og haraftrat við meira specifikkum studningum til útvaldar fyritøkur, til dømis fiskiloyvir, "skattaafturbering" ella "tollendurgjald". Tilskundanarbygnaðirnir í útflutnings-vinnunum verða so hareftir.

Politikarar, um teir sjálvir meina at "vit hava bara eitt bein at standa á" ella ikki, eru nú heftir at áhugabólkunum. Minstakravið frá áhugabólkunum er, at politikarin ikki talar at hesi fatan av, hvussu føroyski búskapurin er skrúvaður saman, og at hann ikki talar at teim studningum, sum verða latnir hesum bólkum. Og einhvør annar sum talar at, verður ákærdur fyri at vera øvundsjúkur.

## *…hjá áhugabólkum við nógvum sosialum kapitali*

Seráhugamálini í fiskivinnuni og alivinnuni hava sostatt gjøgnum skeivu almennu uppfatanirnar fingið búskaparligt og politiskt vald frá almenninginum til at seta seg á politisku tilgongdina, har vinnuligu leikreglurnar í vinnunum verða ásettar. Og verandi leikreglur eru við til at samansjóða áhugabólkin, tí tey, sum hava fingið serrættindi tillutað, hava ein felags áhuga í at varðveita verandi

skipan. Og lítil útskifting í bólkinum av serrættindahavarum ger tað léttari at viðlíkahalda sosiala kapitalin í bólkinum.

Til dømis broytist eigaraskarin í fiskivinnuni ógvuliga lítið og seint. Í nøkrum skipabólkum økist miðalaldurin á skipum og eigurum eitt ár um árið, tað vil siga at stórt sæð eingin útskifting er av eigarunum. Orsøkin er at verandi eigarar halda fast upp á tilfeingisrentuna, sum liggur í fiskiloyvinum, og verða harvið "læstir inni" í skipanini.

## Søguligur bundinskapur í fiskiskapi og aling

Ein onnur orsøk til at verandi aktørar í fiskivinnuni og alivinnuni sita á politisku tilgongdini er vinnuliga og politiska útgangsstøðið, tá leikreglurnar fyri vinnuligum fiskiskapi og fyri aling skuldu skipast.

Hesar vinnur vóru uppbygdar í Føroyum áðrenn nøkur effektiv almenn umsiting var. Til dømis var fiskivinna í Føroyum, langt áðrenn vitan um áseting av reglum fyri búskaparligum virksemi osfr. vóru uppbygd í almennu umsitingini. Tá nágreiniligar skipanir skuldu gerast fyri, hvussu fiskiríkidømið skuldi gagnnýtast, vóru seráhugamálini hinvegin langt síðan skipað í sera væl samansjóðaðar bólkar við stórari politiskari ávirkan. Heldur enn at hugsa um vælferðina hjá borgarunum og skapa karmar um eina dynamiska vinnu, har frí kapping var um fiskin, valdi politiska skipanin leiklutin sum millumgongumann millum áhugamálini hjá teim ymsu skipabólkunum, tá hesir skuldu býta fiskiríkidømið millum sín. Úrslitið var, at fiskiríkidømið varð býtt millum verandi aktørar í teimum ymsu skipabólkunum eftir samráðingarstyrki, og býtið varð niðurfest í sjálva lógina.

At til ber at gera tað øðrvísi, er oljuvinnan eitt dømi um. Av tí at oljuvinnan als ongar røtur hevði í Føroyum, áðrenn tað kom upp á tal at fara at leita eftir olju á føroyskum øki, bar til at hava eitt demokratiskt kjak og at framleiða eina lóggávu fyri virksemið í hesi vinnuni, áðrenn seráhugamálini høvdu møguleika fyri at skipa seg í vælvirkandi lobbyir. Tí hava vit eina oljulóggávu, sum hóast smávegis lýti, kann sigast at vera eitt valaverk, har áhugamálini hjá føroyska borgaranum eru sett í hásæti.

## State Capture í tilfeingisvinnunum

Almenna uppfatanin av týdninginum hjá fiskivinnuni saman við tí søguliga bundinskapi, sum stendst av, at vinnan hevur gamlar røtur í føroyska samfelagnum, hevur gjørt, at veika almenna umsitingin á økinum ongantíð hevur verið nøkur vernd móti væl samansjóðaðu áhugabólkunum. Tí hava áhugabólkarnir í fiskivinnuni frá byrjan sitið á fiskivinnupolitikkinum. Stóra rásarúmið, sum hetta gevur, hevur verið og verður framvegis brúkt til umfatandi kradding.

Eitt dømi um serstøðuna hjá fiskivinnuni er politiska uppfatanin av, hvussu fyritøkurnar í teim ymsu vinnunum skulu lívbjarga sær. Í flestu vinnum er tað kappingarføri hjá tí einstøku fyritøkuni, sum skal lívbjarga henni og teim arbeiðsplássum hon gevur. Men soleiðis er ikki ætlanin at tað skal vera í fiskiskapi. Tað er skriva beinleiðis í lógina um fiskidagar fyri 2005, at "politiska uppgávan gerst at…tryggja, at veiðiflotin kann lívbjarga sær, og at arbeiði verður til flest møguligar hendur kring landið." Hóast tað kanska ikki hevur verið so týðiliga niðurfelt í lóggávuna fyrr, so er hetta sjálvandi ikki eitt nýtt hugskot. Allar serskipanir fyri fiskiskap og fiskivinnu sum heild eru úrslit av hesum hugburði.

Seráhugamálini hava í nógv ár fingið beinleiðis studningar á landsins fíggjarlóg. Øll kenna søguna um Ráfiskagrunn, rækjuævintýr, svartkjaftaævintýr, "afturberingar", veðhald, rentu- og avdráttarfrí

lán osfr., osfr. Tá studningurin var í hæddini í 1980unum fekk fiskivinnan nærum eina milliard krónur árliga á fíggjarlógini.

Beinleiðis studningurin er minkaður nógv síðan tá, men studningur til fiskivinnuna er framvegis ein stór útreiðsla fyri skattaborgaran. Skattalættin til fiskimenn og aðrir studningar kosta hvørt ár landinum um 100 milliónir krónur. Og ein stórur partur av tí uttanlandsskuld, sum tað almenna framvegis rindar rentur og avdráttir av, eru úrslit av effektivum veðhaldum í og saneringum av fiskiflotanum.

Tílíkt oyðileggur sjálvsagt tilskundanina til at tillaga virksemið til vinnuligu marknaðarumstøðurnar, tí heldur enn at fáast við framleiðslu er størri møguleiki fyri vinningi við at fáast við kradding á vinnupolitiska marknaðinum.

Lógin um vinnuligan fiskiskap er barn av politiskum trýsti úr Danmark, men fyrst og fremst er hon ein staðfesting av, at føroysku fiskastovnarnir eru eitt avmarka tilfeingi, og at atgongdin til tað tí eisini má avmarkast. Tá lógin varð smíðað, hevði almenni myndugleikin møguleika at skapa eina dynamiska vinnu, sum stimbrar kapping um avmarkaðu atgongdina til tilfeingið. Hetta kundi verðið gjørt við at skapa vinnuligar leikreglur fyri ein marknað fyri fiskidagar, har marknaðarprísur avgjørdi, hvør slapp at fiska. Men politiski myndugleikin brúkti ikki henda møguleika. Heldur vórðu "søgulig rættindi" hjá reiðaríunum tikin fram um. Tí gjørdist lógin um vinnuligan fiskiskap ein sáttmáli millum ymsu skipabólkarnar, har áhugamálini hjá vanliga borgaranum ikki eru umboðað.

Upprunaligu loyvini, sum vóru latin við lógini um vinnuligan fiskiskap gingu út á sumri í 2004, men ognarrættarin hjá landsins borgarum til fiskiríkidømið verður framvegis ikki tikin í álvara, og fiskastovnarnir verða tí framvegis latnir útvaldum at gagnnýta, uttan at marknaðarprísur verður kravdur afturfyri.

Umframt at fáa tilfeingið ókeypis frá landinum avgera verandi aktørar í vinnuni eisini sjálvir, hvussu teir fara við tí. Landið hevur ein ráðgeva á økinum, nevniliga Fiskirannsóknarstovuna, men hesin ráðgevi verður konsekvent settur til viks, og sjónarmiðini hjá seráhugamálunum vinna frama. Tað er enntá komið so langt, at politiska maktin hjá seráhugamálunum í fiskivinnupolitikkinum er stovnsfest við Fiskidaganevndini. Gjøgnum hesa nevnd áseta ymsu reiðarabólkarnir í veruleikanum sjálvir, hvussu nógvar fiskidagar limirnir í bólkunum skulu hava, tí tilmælini frá Fiskidaganevndini vera altíð fylgd meira ella minni nágreiniliga.

So hóast tað í lógini um vinnuligan fiskiskap stendur at fiskiríkidømið undir Føroyum er "ogn Føroya fólks" og at Fiskimálaráðharrin skal umsita hesa ogn fólksins vegna, so hava verandi aktørar í vinnuni nærum suverenan avgerðarrætt yvir tilfeinginum. Ein so sjónlig politisk staðfesting av, at politikkurin á einum øki skal røkja áhugamálini hjá einum útvaldum áhugabólki heldur enn eitt endamál um vælferð til vanliga borgaran er sera sjáldsom í ríkum, demokratiskum londum.

Alivinnan hevur ikki somu søguligu røtur og tað arbeiða ikki líka nógv fólk í alivinnuni, sum í fiskivinnuni. Tí hava verandi aktørar í alivinnuni ikki sama status millum manna sum áhugabólkarnir í fiskivinnuni, og hava av somu orsøk ikki líka víðar ræsur til sjálvir at áseta leikreglurnar fyri vinnuna. Til dømis hevur lítið verið av beinleiðis almennum studningi á fíggjarlógini til alivinnuna.

Men hóast hetta, so hava tey viðurskifti, sum vóru umrødd omanfyri gjørt, at verandi aktørar í vinnuni hava stórt rásarúm til sjálvir at áseta leikreglurnar fyri sínum virksemi. Frá fyrstu tíð hava fyritøkurnar, sum fingu firðirnar at ala á, meira ella minni sjálvar gjørt av, hvussu tær eru farnar við teimum, uttan at almenni myndugleikin hevur hildið nóg gott skil á, hvussu henda almenna ogn er viðfarin.

## Tilfeingisvinnurnar sum arbeiðsskapandi tiltøk

Ein triðja orsøk til at vinnuligu leikreglurnar fyri tilfeingisvinnurnar eru avlagaðar er, at hóast vinnurnar eru minkaðar sum partur av búskapinum, so arbeiða framvegis nógv fólk í fiskivinnuni og alivinnuni. Á nógvum smáplássum er fiskavirki og skip einastu arbeiðspláss, so um tey hvørva, kann verða neyðugt hjá pørtum av arbeiðsmegini á plássinum at flyta burtur. Hetta leggur trýst á politikkarar um at arbeiða við hond og fót fyri at halda upp á framleiðslustøð og framleiðsluhættir. Og hvørvisjónin um, at fiskivinnan er “beinið, sum búskapurin stendur á”, og at tað tí er neyðugt at fasthalda so nógv arbeiðspláss sum gjørligt í hesi vinnugreinini, verður sjálvsagt eisini nýtt til at leggja trýst á politikkarnar til at syrgja fyri at eisini fyritøkur, sum ikki bera seg, sleppa at halda fram, soleiðis at arbeiðsplássini ikki hvørva.

Brotið í lógini um fiskidagar fyri 2005 um at “politiska uppgávan gerst at…tryggja, at arbeiði verður til flest møguligar hendur kring landið”, saman við ítøkiligum politiskum tiltøkum vísir, at trýstið hevur givið úrslit. Tað eru nógvar kappingarblokeringar í tilfeingisvinnunum, sum gera, at kappingarførið í hesum vinnum - tað at kunna avløna kapitali og arbeiðskraft minst líka væl sum alternativar framleiðslur – ikki botnar í produktiviteti, men júst í serskipanum:

- Forboð er móti at virka fisk umborð á skipum
- Ringt er hjá privatum at kappast móti Fiskavirking, JFK osfr., tí politikararnir, sum varða av almenna kapitalinum í fyritøkunum borgarans vegna, ikki krevja avkast av kapitalinum, men heldur nógv arbeiðspláss.
- Skattligir fyrimunir fyri fiskimenn forða fyri, at fyritøkur aðrastaðir í búskapinum keypa arbeiðsmegina á fiskiskipum
- Ókeypis rávørutilfeingi til tilfeingisvinnurnar
- Fiskavirkisskipanin bindur arbeiðsmegi til tilfeingisvinnurnar við ALS-pengum
- Avmarkingar á sølu av fiski

### *Vaksandi trupulleiki*

At brúka almennan studning til at halda upp á arbeiðspláss í tilfeingisvinnunum, sum tað ikki er vinnuligt grundarlag undir, kann gerast ein negativ ringrás. Útbúgving er av avgerandi týdningi fyri møguleikan hjá tí einstaka at tillaga seg broytingar í búskaparliga umhvørvinum, tí framhaldandi størri krøv eru til útbúgving innanfyri flest øll arbeiði.

Tøkniligu frambrotini í dag eru eisini av slíkum slag, at avkastið til útbúgving gerst alsamt størri. Hetta hendir, tí produktivitetsøkingarpotentialið er størri á hávitanarøkjum, enn á lágvitanarøkjum har fysiska arbeiðið leggur eitt loft yvir, hvussu nógv kann fáast í produktivitetsvinningi afturat burturúr hvørjum arbeiðstíma. Tí síggja vit í framkomnu ídnaðarlondunum eina gongd móti, at størri munur verður millum lønirnar hjá fólki við høgari og lítlari útbúgving. Framhaldandi útbúgving av arbeiðsmegini er tí samstundis ein neyðug fyritreyt fyri einum høgum inntøkustøði í samfelagnum sum heild.

Men av tí, at nógv ófaklærd eru bundin at skipum, flakavirkjum, sláturvirkjum osfr. fyri sína úrtøku, er politiskur vilji til at halda hesum virkjum í gongd fyri at halda upp á arbeiðsplássini. Teir bólkar, sum vegna studningar og kappingarforðingarnar á henda hátt fáa hægri løn enn produktiviteturin gevur grundarlag fyri, vilja sjálvsagt vera ímóti burturtøku av tiltøkunum. Neyðhildið verður í hesum arbeiðsplássum við av geva studning av ymsum slag, tí “hvat skulu tey gera, um

arbeiðsplássið hvørvur". Úrslitið er framhaldandi mótstøða móti avtøku av avlagandi tiltøkunum. Hetta forðar so aftur fyri, at satsað verður upp á útbúgving, soleiðis at hesi fólkini ella børn teirra hava fleiri valmøguleikar í gongdini móti støðri og størri krøvum til førleikar.

Úrslitið verður framhaldandi skeiv samanseting av arbeiðsmegini. Hon verður ov lítið útbúgvin og samansetingin millum tilfeingisvinnurnar og aðrar vinnur verður skeiv. Hetta leiðir so aftur til at produktiviteturin í samfelagnum ikki økist líka skjótt sum í londunum rundan um okkum, og vit vera tí fátækari samanborið við hesi lond.

Men fyrr ella seinni ber ikki til at halda upp á hesi ófaklærdu arbeiðsplássini í tilfeingisvinnunum longur. Tá ófaklærdu arbeiðsplássini á flakavirkjum og umborð á skipum hvørva, kunnu nøkur fáa arbeiði í heimamarknaðarvinnum, til dømis í byggivinnuni ella sum gongsgentur, hjálparfólk, vaskifólk, kassadamur osfr., men uttan eina útbúgving eru møguleikarnir avmarkaðir.

### *Vend má koma í*

Tilfeingisvinnurnar eru av avgerandi týdningi fyri føroyska búskapin, tí framleiðslan í hesum vinnum rindar fyri ein stóran part av føroyska innflutninginum. Tað er avgerandi neyðugt at leikreglurnar fyri vinnuligt virksemi er soleiðis, at tilskundanin er yvir móti produktivitetsøkjandi tiltøkum heldur enn móti arbeiðsskapandi tiltøkum. Við at tvíhalda um lágútbúgvingararbeiðspláss við at veita sersømdir til tilfeingisvinnurnar verður forða fyri, at vinnulívið satsar uppá útbúgving, og tað fær útbúgvingarfrekvensin at gerast lægri enn annars. Tað kemur at merkjast enn meira í inntøkumununum millum okkum og grannalondini í framtíðini – um ikki vend kemur í.

## Almennur partapeningur

Umframt at eiga Fiskavirking eigur tað almenna ein stóran part av øllum partapeningi í Føroyum. Í fleiri vinnum situr ein almenn fyritøka tungt á marknaðinum og verður ikki í sama mun kravd eftir avkastið til eginpeningin. Politiskt motiveraður og alment fíggjaður partapeningur er eitt slag av studningi, sum ofta viðførir leysari fíggjarligar teymar fyri tær fyritøkur, ið fáa gleði av studninginum.

Hetta leggur skeivt trýst á leiðslurnar í hesum almennu fyritøkum. Í fyrra lagi gerst tað sera trupult hjá øðrum fyritøkum at kappast, tí kappingin um arbeiðsmegi og kapital ikki fer fram undir somu fortreytum. Tí verður ikki neyðuga trýstið lagt á almennu fyritøkurnar framhaldandi at økja produktivitetin fyri at vera kappingarførar.

Í øðrum lagi minkar framdriftin í almennu fyritøkunum, tí almennu fyritøkurnar hava oftast ikki somu møguleikar sum privatar fyritøkur at tillaga seg broyttum umstøðum. Hesar fyritøkurnar eru ofta "til sølu" á vinnupolitiska marknaðinum skilt á tann hátt, at áhugabólkarnir á vinnupolitiska marknaðinum hava stóra ávirkan á, hvussu hesar fyritøkur vera stýrdar. Almennur kapitalur er av náttúru defensivur: tað er meira umráðandi ikki at gera nakran feil, enn at skara framúr, og samstundis leggur almennur ognarskapur ofta de facto politiskar bindingar á, hvussu almennu fyritøkurnar kunnu virka. Tað er ikki møguligt at niðurleggja fyritøkuna og flyta peningin yvir í aðrar vinnur, tað er nógv truplari at minka um talið á arbeiðsfólki osfr. Mest upplagda dømi um hetta er Postverkið.

Úrslitið er, at tillagingin við at fyritøkur koma inn á marknaðin meðan aðrar fara av marknaðinum verður minni effektiv, soleiðis at fyritøkur, sum ikki eru kappingarførar, kunnu halda fram, um tær fáa almennan partapening ella annað slag av studningi. Ofta er tað sostatt ikki tær mest produktivu

fyritøkurnar, ið nýta framleiðslufaktorarnar. Tað er tí sera sannlíkt, at almenni ognarskapurin er við til at gera búskaparvøksturin minni enn annars.

## Skeiv regulering í heimamarknaðarvinnum

Tann vigingin millum stórdrift og kapping, sum er galdandi í nógvum heimamarknaðarvinnum í øllum londum er serliga kostnaðarmikil í Føroyum. Í øðrum londum ber sum oftast til at fáa nakað av báðum, tí marknaðurin er rímiliga stórur. Men í Føroyum skal ofta so lítið av stórdrift til at kappingin hvørvur, at ofta er tað ein spurningur um ”annaðhvørt, ikki bæði”. Úrslitið hevur oftast verið at stórdriftin hevur verið við yvirlutan, soleiðis at ein ella tvær fyritøkur hava sett seg á marknaðin. Tað er ikki vist at tað hevði verið til fyrimuns fyri borgaran, um úrslitið heldur var fleiri kappingarneytar, tí kostnaðarstøðið í framleiðsluni hevði verið hægri, orsakað av manglandi stórdrift. Tí er møguleiki fyri, at prísirnir høvdu verið hægri enn teir eru við monopoli ella duopoli.

Hetta er sostatt truplar vigingar, men tær skulu gerast fyri at fáa sum frægast burtur úr eini truplari støðu. Tí er neyðugt við einum vælvirkandi kappingareftirliti. Og á hesum øki eru Føroyar eftirbátur. Kappingareftirlitið virkar nevniliga illa í nógvum týðandi heimamarknaðarvinnum.

Ein trupulleiki er helst tengdur at viðurskiftunum, sum vórðu viðgjørd omanfyri, nevniliga at tað almenna eigur ein so stóran part av vinnulívinum. Í fleiri vinnum eru gjørdar “føroyskar loysnir”, tað vil siga at serlógir eru gjørdar fyri økið, soleiðis at kappingarlógin er sett úr gildi, samstundis sum hálvalmenn monopol seta seg á marknaðin.

Heldur enn at framala kapping, avlagar vinnupolitikkurin sostatt kappingina ella beinleiðis forðar fyri kapping á nógvum innanlands marknaðum. Til dømis er trupult hjá privatum at kappast við SEV, tí fyritøkan hevur avgerandi orðið viðvíkjandi nýtslu av elnetinum.

Úrslitið er at kappingarlógin er galdandi fyri bakarar, kioskir og aðrar líknandi marknaðir, men tá tað kemur til týðandi marknaðir sum postverk, flogferðslu osfr., er kappingin ikki til at fáa eyga á. Kostnaðarstøðið verður hægri enn neyðugt, og borgarin rindar rokningina.

## Er tað verri enn í øðrum londum?

Eru vinnuligu leikreglurnar í Føroyum verri enn í londunum rundan um okkum? Ber til at siga, at tað eru vinnuligu leikreglurnar sum hava ábyrgdina av, at vit ikki eru líka rík, sum londini rundan um okkum?

Svarið er ja av tveimum orsøkum. Í fyrra lagi eru fiskivinnan og alivinnan í Føroyum ein lutfalsliga størri partur av samlaða vinnalívinum enn høvuðsvinnurnar eru í øðrum ríkum londum. Tað er sjáldsamt millum ríku londini í heiminum, at tilfeingisvinnur standa fyri meira enn einum fjórðingi av bruttofaktorinntøkuni, soleiðis sum fiskivinnan og alivinnan gera í Føroyum. Til dømis stendur fiskivinnan í Íslandi í løtuni fyri umleið 12 prosentum av íslendsku bruttofaktorinntøkuni, sum er helvtin av fiskivinnunnar parti av føroysku bruttofaktorinntøkuni. Tí hevur skeiv umsiting av hesum vinnum nógv størri avleiðingar enn skeiv umsiting av høvuðsvinnunum í øðrum londum.

Í øðrum lagi er umsitingin av fiskivinnuni í Føroyum sera avlagandi fyri vinnubygnaðin í landinum. Tað eru ikki bara smávegis studningar ella líknandi vinnuligar leikreglur, sum eru avlagandi. Mest grundleggjandi leikreglan, nevniliga ognarrætturin hjá tí almenna til tilfeingið og harvið rætturin til at innkrevja avkastið frá tilfeinginum, verður ikki handhevjaður, ein stórur partur av kapitalapparatinum er lagdur til skattaborgaran at gjalda rentur og avdráttir fyri, arbeiðsmegin fær sersømdir, soleiðis at kappingin hjá arbeiðsgevarunum við arbeiðsgevarar í øðrum vinnum um arbeiðsmegina verður minni, osfr. osfr.

Oman á hetta kemur so, at aftur fyri sersømdirnar blandar politiska skipanin seg í hvønn smálut viðvíkjandi tillaging hjá fyritøkunum, hvør skal fiska hvar, hvørt skipini skulu vera stór ella lítil, brúka húk ella trol osfr. osfr. Alt hetta ger, at effektiv tillaging gjøgnum kapping í einum fríum marknaði, sum er tað, ið skal dríva produktivitetsvøksturin í høvuðsvinnuni, er hvørki til fyrimuns fyri einstøku fyritøkuna í vinnuni, tíansheldur møgulig. Úrslitið er ein høvuðsvinna, sum ikki er tann drívmegi fyri búskaparvøksturin í landinum, sum hon kann vera.

Í heimamarknaðarvinnunum er støðan eitt sindur øðrvísi. Sum umrøtt omanfyri stavar ein partur av muninum í inntøkustøðinum upp til ríkari grannarnar frá smáu heimamarknaðunum, men tað er avmarkað, hvussu nógv ber til at gera við tað. Og tað er ikki sannlíkt, at tað er í vinnum, har almenn monopol sita á marknaðinum, at tann stóri munurin millum inntøkustøðið í Føroyum og grannalondunum stavar. Ein blanding av búskaparligum og politiskum orsøkum hava nevniliga gjørt, at elveiting, flogferðsla, telefonverk, postverk og líknandi eru vinnur, sum í nógv ár hava verið viðfarnar øðrvísi enn aðrar vinnur, ikki bara í Føroyum, men í flestu øðrum londum eisini.

Hetta merkir ikki, at tað ikki kann gerast betri. Neyðugt er at hava eitt sterkt og virki kappingareftirlit. Og møguleikin fyri at liberalisera vinnur, sum í løtuni eru almenn monopol, eigur alla tíðina at verða kannaður. So hvørt tøknilig frambrot hava gjørt tað møguligt at skapa kapping í vinnum sum til dømis elveiting og postflutningi, og politisk undirtøku er skapt fyri tí, eru tær í øðrum londum vorðnar privatiseraðar og komnar undir vanligt kappingareftirlit. Neyðugt er at fylgja við á hesum øki, og alla tíðina kanna, hvørt tað er gjørligt at ganga somu leið í hesum vinnum í Føroyum.

## Lágur produktivitetur

Vánaligu vinnuligu leikreglurnar ávirka í síðsta enda inntøkustøðið gjøgnum ávirkan á nøgdina, samansetingina og produktivitetin av framleiðslumiðlunum.

### *Útbúgvingarstøði*

Nú finnast ongi hagtøl hjá okkum – øll onnur framkomin lond hava annars hagtøl á hesum øki – men eitt kvalifiserað boð er, at millum 75 og 80 prosent av einum árgangi í Føroyum taka eina miðnámsútbúgving. Í grannalondunum liggja tølini frá gott 80 prosentum í Íslandi upp móti 90 prosentum í teim stóru Norðurlondunum. Og allarhelst eru færri, sum taka eina longri útbúgving í Føroyum enn í t.d. Íslandi ella Danmark.

Hetta hevur sjálvsagt ávirkan á, hvussu dugnalig arbeiðsmegin er til at tillaga seg broytingar í framleiðslutøknini, og harvið hvussu produktiv hon er. Og politikararnir gera tað ikki betri við at spara uppá undirvísing og gransking, tí vit hava stuttíðarútsving á fíggjarlógini.

### *Kapitalapparat*

Eingin vitan er um hetta øki, tí hagtøl finnast ikki fyri støddina av kapitalapparatinum í Føroyum. Men uppsparingin í Føroyum er líka stór sum í londunum rundan um okkum og fíggjarkervið virkar á leið líka væl, so eingin orsøk er at halda, at støddin á kapitalapparatinum per íbúgva er minni enn í grannalondunum. Hinvegin er orsøk til at halda, at vinnuligu leikreglurnar fyri flest allar týðandi vinnur í Føroyum skapa skeiva samanseting av kapitalapparatinum, bæði innanhýsis í teim einstøku vinnunum og millum vinnugreinarnar.

## *Tøkni og produktivitetur*

Føroyingar hava atgongd til mest framkomnu tøknina. Men hetta er ikki einstýðandi við at fyritøkurnar hava tilskundan til at taka tøknina í brúk. Heldur ikki er tað einstýðandi við, at vit hava fólk við neyðugu vitanini at brúka tøknina. Tað vil siga, at atgongd til mest framkomnu tøknina ikki av sær sjálvum førir til "best-practice" loysnir. Tilskundanin til at brúka hesar "best-practice" loysnir hevur líka nógv at siga, sum sjálv atgongdin til tøknina. Og sum umrøðan av vinnuligu leigreglunum omanfyri hevur gjørt greitt, so er grundleggjandi niðurstøðan í hesi frágreiðingini júst, at tilskundanin til at gera íløgur í ta samanseting av útbúgving, kapitalapparati og tøkni, sum geva størst produktivitet, heldur enn at skapa privatbúskaparligt ella politiskt avkast við kradding av ymsum slag, ofta ikki er til staðar.

# Hvat kann gerast betri?

Búskaparráðið tekur í hesari frágreiðingini til viðgerðar evnið um búskaparvøkstur og búskaparliga vælferð.

Spurningurin um, hvat ið er atvoldin til, at summi lond enda í fátækradømi, meðan onnur gerast alt ríkari, mann vera mest avgerandi spurningurin, búskaparfrøðin kann seta og royna at greina.

Føroyar teljast ikki millum heimsins fátækastu lond, heldur tvørturímóti. Men kortini er áhugaverdi spurningurin, hví BTÚ upp á íbúgvan er minni í Føroyum enn í grannalondunum, og hví búskaparliga vælferðin hjá borgarunum ikki er so stór sum í grannalondunum - sjálvt við ríkisstuðli úr Danmark

Í yvirskriftini spyrja vit tí tveir spurningar:

- Hví eru vit so rík, samanborið við so mong onnur lond í heiminum?
- Men kortini ikki so rík sum nærmastu grannalondini?

Samstundis sum hetta eru teir einamest avgerandi búskaparligu spurningarnir at seta um eitt samfelag, eru hetta umfatandi spurningar, sum vit ikki kunnu seta okkum fyri at veita fullfíggjað svar uppá.

Vit hava tí avmarkað viðgjørdu spurningarnar til at snúgva seg um "búskaparliga vælferð", soleiðis sum hon nú einaferð kann mátast við t.d. BTÚ upp á íbúgvan og øðrum peningaligum mátum. Undir hesum fortreytum halda vit kortini, at tað ber til at geva eitt munandi íkast til at svara spurninginum um, hví vit nú einaferð eru ríkari enn Malawi, men fátækari enn Ísland.

## Tað ræður um politikk

Avgerandi niðurstøðan í frágreiðingini er, at tá um ræður búskaparvøkstur, er tað produktiviteturin sum gevur vøkstur og førir til meiri búskaparliga vælferð.

Vit viðgera stutt tann meiri vælkenda partin av búskaparfrøðiligum orsøkum til búskaparvøkstur, sum serstakliga vísir á, at tøkniligur framburður, stórar kapitalíløgur og framkomin útbúgving eru keldurnar til produktivitetsvøkstur og harvið til vaksandi vælferð.

Fyri at hesar keldur til búskaparvøkstur skulu koma til sín rætt vísir tað seg tó, at skil má samstundis vera á samfelagsliga undirstøðukervinum. Eitt vælvirkandi undirvísingarverk, ein vælvirkandi arbeiðsmarknaður, vælvirkandi fíggjarkervi, vøru- og tænastuhandil undir frælsum korum, greið ognarviðurskifti, sosialar trygdarskipanir og støðug, skilagóð politisk viðurskifti – øll hesi skulu til, skal frægasti produktivitetsvøksturin fáast burtur úr íløgunum í kapital, tøkni og vitan.

Føroyar hava í stóran mun brúkt teir fyrimunir, sum koma av at vit liggja í ríkara partinum av heiminum. Vit hava havt førleikan til at taka til okkum ta tøkni og tær hugmyndir um samfelagbygnað, sum koma uttaneftir. Í dag er føroyska samfelagið tí rættuliga væl fyri við samfelagsligum undirstøðukervi. Samstundis sum føroyingar hava verið dugnaligir at taka við nýggjum framleiðslumøguleikum, sum standast av frambrotum í tøkni seinastu nógvu árini, so hava vit eisini í ein ávísan mun dugað at framt neyðugu bygnaðarligu tiltøkini.

Samstundis sum eitt gott samfelagsligt undirstøðukervi er orsøkin til, at vit eru so rík sum vit eru, so er orsøkin til at vit ikki eru eins rík og grannalondini, at samfelagsliga undirstøðukervið ikki er nóg gott. Hóast Føroyar ikki eru eitt fátækt land, so meta vit, at munurin millum inntøkustøðið í

Føroyum og í grannalondunum stendst av somu fyribrigdum sum munurin millum fátøk lond og rík lond.

## Politiskur førleiki…

Meðan samfelagsliga undirstøðukervið er á góðari leið, hóast tað sjálvsagt altíð kann og skal gerast betri, eru stórir trupulleikar við vinnuligu leikreglunum í flest øllum týðandi vinnum í Føroyum. Neyðugt er í nógv størri mun enn tað hevur verið gjørt higartil, at gera vælskipaðar vinnuligar leikreglur, sum geva fólki tilskundan til at gera íløgur í meira effektiva tøkni og útbúgving, og sum eggja einstaklingum og fyritøkum til at gera royndir við nýggjum vørum og tænastum, nýggjum marknaðum osfr., men sum samstundis sálda burtur miseydnað vinnuligt virksemi.

Størsta forðingin fyri at Føroyar kunnu fáa sama inntøkustøði sum grannalondini er ein álvarsligur mangul upp á politiskan førleika á búskaparliga økinum. Almenna umsitingin í Fiskimálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum er framvegis alt ov veik til at vera ein munadygg verja av áhugamálunum hjá borgarunum um hægri vælferð mótvegis kradding frá seráhugamálum. Úrslitið er, at mest sum allar politiskar skipanir á vinnuligum økjum, har væl samansjóðað seráhugamál finnast, eru út av lagi vánaligar, sæð frá samfelagsligum sjónarhorni.

Henda støða kemst av, at seráhugamálini settu seg á politikkin í teim ymsu vinnunum, áðrenn almenna umsitingin var komin á eitt støði, har hon kundi vera ein effektiv mótvekt móti áhugabólkunum.

Fiskivinnulobbyin hevur eisini rikið fiskivinnupolitikkin í Føroyum í nógv ár. Og ein formlig staðfesting av hesum er orðingin í uppskotinum um fiskidagar fyri 2005 um at

Til dømis er lógin um vinnuligan fiskiskap ein sáttmáli millum ymsu skipabólkarnar, har áhugamálini hjá borgarunum ikki eru umboðað. Á sama hátt var tað alivinnan, sum skipaði fyri almenna alipolitikkinum frá byrjan og inntil fyri heilt stuttari tíð síðan, tá vánaliga almenna eftirlitið við vinnuni gjørdi, at hon mest sum fór fyri bakka.

Mótstøðan frá seráhugamálum og politikkarum móti at fáa eina effektiva og sterka umsiting er sjálvsagt stór. Ein sterk umsiting hevði sannlíkt viðført, at endamálið við vinnuligu leikreglunum í hesum vinnum hevði verðið vælferðin hjá borgarunum heldur enn privatbúskaparligur vinningur hjá seráhugamálunum. Seráhugamálini hava tí syrgt fyri, at henda støða ikki er broytt munandi, hóast umsitingin er styrkt nakað, og politikkarnir halda seg til ”tætt samstarv við vinnuna” heldur enn at fáa eina munadygga umsiting.

Oljuvinnulóggávan er kanska einasta dømið um, at áhugamálini hjá borgarunum eru sett fremst. Í mun til støðuna í til dømis fiskivinnuni og alivinnuni var umsitingin av oljuvinnuni í Føroyum upp á pláss líka skjótt sum seráhugamálini. Seráhugamálini í oljuvinnuni hava tí ongantíð havt møguleika fyri at seta seg á politisku tilgongdina, sum ásetir vinnuligu leikreglurnar í vinnuni.

## …og vilji

Tá til stykkis kemur, ræður um tann politiska viljan til at fáa marknaðarligu viðurskiftini løgd til rættis. At fáa eitt vinnulív, sum í størri mun fremur røttu íløgurnar rættstundis, er frammalaga í at handfara tøkni og at fáa dugnaskap og kunnleika í framleiðslu til vega – alt hetta krevur størri politiskan dugnaskap í framleiðslu av samfelagsligum undirstøðukervi, skulu vit megna at leggja leiðina móti størri búskaparligum framburði, enn vit higartil hava megnað.

Vit koma í frágreiðingini til ta niðurstøðu, at tá um ræður skipan av marknaðarligum leikreglum, arbeiðir politiska maktin í Føroyum í ov lítlan mun út frá einum sjónarmiði um mest møguliga vælferð til vanliga borgaran. Stýrt verður í ov stóran mun sambært seráhugamálum hjá bólkum í samfelagnum, heldur enn sambært tí, sum gagnar búskaparvøkstrinum og búskaparligu vælferðini sum heild.

Tað er avgerandi neyðugt at sleppa politiska setninginum um, at allar vinnuligar leikreglur skulu ásetast “í tøttum samstarvi við vinnuna”. Grundleggjandi læran, sum frágreiðingin vísir á, er, at uttan greiðan skilnað millum uppgávurnar hjá politiska myndugleikanum á aðrari síðuni og fyritøkum og øðrum seráhugamálum á hinari síðuni, verður einki broytt.

## Almenna uppgávan

Væleydnað tillaging til avbjóðingarnar í alheims búskapinum er ikki fingin til vega eina ferð fyri allar og er ikki bara grundað í loysnir upp á søguligar avbjóðingar. Væleydnað tillaging er úrslit av framhaldandi dugnaskapi hjá samfelagnum at skapa nýggjar bygnaðarligar skipanir, sum styðja undir royndirnar hjá einstaklingum og fyritøkum at finna nýggjar leistir fyri produktivum framleiðsluvirksemi.

Spurningurin um, hvussu spælireglurnar skulu skipast á besta hátt fyri at vera gagnligar fyri produktivitetsvøkstri og harvið høgum inntøkustøði er sostatt ikki ein spurningur um, hvørt tað almenna skal vera við ella ikki, men ein spurningur um, hvør leikluturin hjá tí almenna skal vera. Eingin ivi er um, at ”tað almenna skal taka við, har tað privata ikki røkkur”, men avgerandi neyðugt er at vera greiður yvir, hvat hetta merkir.

Eingin nágreinilig uppskrift finst fyri, hvussu farast skal fram í byggingini av vinnuligum skipanum. At byggja vælvirkandi vinnuligar skipanir tekur tíð, og tilgongdin kann steðga ella ganga skeiva vegin orsakað av politiskum trætum ella búskaparligum og sosialum umstøðum. Men grundleggjandi lærusetningarnir eru teir somu í øllum førum.

Flestu royndir at gjøgnumføra politiskar broytingar í leikreglunum henda í einum millumbili í framvøkstrinum av vitan í samfelagnum, og ikki heilt frá byrjan. Seráhugamál eru til staðar líka frá byrjan og koma framhaldandi undan kavi. Fáar vinnuligar leikreglur verða skaptar heilt frá botni, frá eini støðu, har eingin hevur vælspecifiserað seráhugamál. Men samstundis verða leikreglurnar ongantíð høgdar í stein soleiðis, at einki rásarúm er fyri broytingum seinni.

At leikreglurnar í flest øllum vinnum alla tíðina verða tillagaðar sum úrslit av einum framhaldandi samspæli millum áhugabólkar og verandi vinnuligar leikreglur gevur tí almenna eina greiða uppgávu. Almenna uppgávan er at umboða borgaran í hesum spælinum, tað vil siga í øllum samskifti við fyritøkur og onnur seráhugamál at umboða áskoðanina um, at tað er vælferðin hjá øllum føroyskum borgarum, sum telur, og ikki einstakar fyritøkur, vinnubólkar, arbeiðspláss ella líknandi.

Tað er ikki uppgávan hjá tí almenna at halda saman upp á aktørar í einum vinnubólki. Tvørturímóti er almenna uppgávan at vera ein mótvekt móti teimum seráhugamálum, sum royna at ávirka leikreglurnar til sín egna fyrimun og at royna at taka hædd fyri, at nýggjar leikreglur ikki skapa óneyðuga nógv nýggj seráhugamál. Um almenni bygnaðurin ikki er nóg effektivur at standa ímóti trýstinum frá áhugabólkum, verður úrslitið kradding heldur enn produktiv framleiðsla.

## Vælvirkandi vinnuligir marknaðir

Av avgerandi týdningi fyri inntøkustøðið í einum landi er, í hvønn mun búskapurin eggjar til framleiðslu heldur enn kradding. Um bygnaðarligu skipanirnar eru innrættaðar soleiðis, at tað er kradding, ið gevur størst privatbúskaparligt avkast, vilja einstaklingar og fyritøkur brúka sína orku upp á at ogna sær vitan og lærdóm, ið ger tey dugnaligari til kradding. Um tað hinvegin er produktivitetsøkjandi virksemi, ið gevur størsta privatbúskaparliga avkasti, vil inntøkustøðið hækka framhaldandi.

Fyri at fyritøkurnar skulu vera so produktivar sum gjørligt og harvið vera við til at skapa so høgt inntøkustøði í landinum sum gjørligt, er neyðugt at tað eru vinnuligu marknaðarumstøðurnar, sum stýra tillagingini av framleiðsluni heldur enn vinnupolitisku marknaðarumstøðurnar. Fremsta fortreyt fyri hesum er, at vinnupolitisk marknaðartillaging ikki gevur fyritøkunum størri privatbúskaparligan vinning enn møguleiki er fyri við vinnuligari marknaðartillaging. At minka um møguleikarnar fyri vinningi á vinnupolitiska marknaðinum og geva størri pláss fyri kapping á vinnuliga marknaðinum eigur tí at verða raðfest fremst. Umframt at avmarka møguleikarnar fyri kradding, viðføra skilagóðar vinnuligar leikreglur effektiva regulering av kappingini á vinnuliga marknaðinum soleiðis, at kappingarførið botnar í produktiviteti, heldur enn í til dømis monopolisering av marknaðinum.

### *Útflutningsvinnur*

Dynamiskar vinnur verða skaptar gjøgnum vinnuligar leikreglur sum stimbra kapping. Í nøkrum vinnum, fyrst og fremst útflutningsvinnunum, ger náttúrliga og tøkniliga umhvørvið tað møguligt hjá nógvum fyritøkum at bjóða seg fram. Tá ber til við fáum spælireglum at skipa soleiðis fyri, at fyritøkurnar í síni stremban eftir vinningi velja framleiðslu heldur enn kradding, tí í hesum vinnum vilja fyritøkurnar trýsta hvørja aðra, soleiðis at ikki er neyðugt við nógvari almennari uppíblanding. Í hesum vinnum skal tað almenna bara syrgja fyri mest grundleggjandi fyritreytunum.

Tað er ikki uppgávan hjá tí almenna at syrgja fyri at veiðiflotin – ella nøkur onnur vinna - kann lívbjarga sær. Tað er uppgávan hjá tí einstøku fyritøkuni at syrgja fyri at hon er kappingarfør, tað vil siga kann lívbjarga sær. Uppgávan hjá tí almenna er at virka fyri, at evnini hjá tí einstøku fyritøkuni at lívbjarga sær standast av høgum produktiviteti og ikki av serligum skattalættum, ”skattaafturberingum”, ókeypis atgongd til framleiðslumiðlar, til dømis fisk í sjónum, ella líknandi.

Á sama hátt eru tað ikki politisk tiltøk, sum skulu tryggja, at ”arbeiði verður til flest møguligar hendur [í fiskivinnuni] kring landið.” Tað er kappingarførið hjá tí einstaka reiðaríinum og tí einstaka flakavirkinum, sum skal tryggja arbeiði til arbeiðsfólki, ikki politisk tiltøk, sum til dømis at útihýsa útlendskari kapping.

Forðingar fyri kapping á marknaðinum, sum tað almenna kann bøta um, eru serliga illa specifiserað ognarrættindi og vánalig handhevjing av teimum. Aðrar forðingar eru forðingar fyri atgongd hjá nýggjum aktørum at bjóða seg fram á marknaðinum og manglandi gjøgnumskygni um marknaðarviðurskifti, til dømis ógreitt lógarverk á økinum. Serliga eiga almennar forðingar fyri at koma inn á og fara út av marknaðum at verða minkaðar mest møguligt.

Til dømis hevði fiskiskapur sannlíkt verið ein sera dynamisk vinna, við nógvum mobiliteti og stórum produktivitetsøkingum, um frí kapping var um ráværuna, t.e. fiskin í sjónum. Í fiskiskapi verður hetta gjørt við at taka ognarrættin til tilfeingið í álvara og krevja marknaðarprís fyri tað, til dømis við at innføra skipanina, sum er skotin upp frá Búskaparráðnum.

Regulering við at krevja marknaðarprís fyri tilfeingið, til dømis gjøgnum uppboðssølu, er skilabesti og effektivasti háttur at sleppa undan kradding, og hevði samstundis forða fyri, at tilfeingisrentan hvarv millum fingrarnar á tí almenna. Hetta hevði givið landskassanum inntøkur, sum ikki avlaga marknaðarprísirnar. Tað er tvørturímóti marknaðaravlagandi, tá tað almenna gevur náttúrutilfeingi til útvald fyri 0 krónur uttan at loyva øllum, sum hava hug til tess, at bjóða upp á rættindini.

Kanska týdningarmesta ávirkanin av vælvirkandi marknaðum fyri náttúrutilfeingi er, at teir føra við sær fyrimunir fyri restina av búskapinum. Frí og opin søla av rættindum og loyvum til náttúrutilfeingi í opnum marknaðum hjálpa til við at økja produktivitetin, ikki bara í hesum vinnunum, men eisini í øðrum vinnum. Í fyrsta lagi hevði minni tørvur verið á at lagt skatt á borgararnar. Í øðrum lagi er tað so, at so hvørt sum produktiviteturin í fiskiskapi økist, verður brúk fyri alsamt minni arbeiðsmegi í hesum vinnum, og arbeiðsmegi verður tí flutt yvir í meira produktiv størv aðrastaðni í búskapinum.

### *Heimamarknaðarvinnur*

Í øðrum vinnum, fyrst og fremst heimamarknaðarvinnunum, er náttúrliga og tøkniliga umhvørvið soleiðis, at trupult er hjá nýggjum fyritøkum at bjóða seg fram í kappingini við tær, sum longu eru á marknaðinum. Í nógvum vinnum er tað so, at ein fyritøka má hava eina ávísa støðd fyri at vera rikin optimalt, til dømis fyri at kunnu nýta tøknina í framleiðsluni optimalt. Ein kiosk ella hárfríðkanarstova kann bjóða seg fram á marknaðinum uttan stórar íløgur, men til dømis ein tryggingarfyritøka má hava eina ávísa støðd fyri at kunna bjóða seg fram á marknaðinum. Er marknaðurin samstundis lítil, er skjótt at tað ikki er vinnuligt grundarlag fyri fleiri fyritøkum á marknaðinum. Tá kann tað vera lætt hjá einari ella nøkrum fáum fyritøkum at seta seg á marknaðin.

Hetta er støðan í nógvum heimamarknaðarvinnum í Føroyum. Føroyski heimamarknaðurin er sera lítil í mun til støddina av optimalum framleiðslueindum, og tí kann tað ofta vera trupult at skapa nakað serligt av kapping á teim einstøku marknaðunum. Úrslitið er at nógvir stakmarknaðir í føroysku heimavinnuni eru eyðkendir av monopolum og duopolum.

Fyri at fáa kappingina á hesum marknaðum so effektiva sum gjørligt krevjast gjølliga greinað regluverk og stýring. Her hevur tað almenna eina stóra uppgávu at skipa regluverkini soleiðis, at trýst alla tíðina er á fyritøkunum á marknaðinum at vera produktivar. Hetta kann fyrst og fremst gerast við at minka mest møguligt um forðingarnar fyri, at nýggjar fyritøkur sleppa inn á marknaðin.

Men ofta er tað almenna partur av trupulleikanum heldur enn partur av loysnini. Serliga eru serlógirnar á fleiri týðandi økjum, sum til dømis innan loftferðslu og elveiting, viðvirkandi til at hesir marknaðir eru lættari enn annars at monopolisera, tí almennu regluverkini gera tað truplari heldur enn lættari hjá nýggjum fyritøkum at bjóða seg fram á marknaðinum.

Tað kann vera trupult at framala kapping á einum lítlum marknaði, men almennu reglurnar eiga í ongum førum at vera forðingin fyri kapping. Tí eigur kappingarlóggávan at vera galdandi á øllum marknaðum innanlands, og Kappingarráðið eigur at vera raðfest nógv hægri.

## Privatiseringar

Hóast tað ofta verður havt á lofti í fjølmiðlunum, so er endamálið við privatiseringum ikki at skaffa pening til at niðurrinda almenna skuld ella vágaspjaðing. Almennar fyritøkur skulu privatiserast fyri at fáa tær burtur av vinnupolitiska marknaðinum og inn á vinnuliga marknaðin. Fyri almennar fyritøkur eru tað alt ov ofta vinnupolitisk endamál, til dømis politisk ynski um arbeiðspláss, heldur

enn endamál um nøktandi avkast til kapital og arbeiðsmegi gjøgnum høgan produktivitet á vinnuliga marknaðinum, sum vera fylgd. Føroya Fiskavirking og Postverkið eru góð dømi. Hetta ger almennu fyritøkuna minni produktiva, enn hon annars hevði verið. Samstundis minkar politiska verjan av almennu fyritøkuni, til dømis við serligum studningum, møguleikarnar hjá øðrum fyritøkum at kappast gjøgnum høgan produktivitet. Úrslitið er minni vælferð fyri føroyska borgaran.

Eisini sæð frá hesum sjónarhorni, heldur enn frá einum sjónarmiði um vágaspjaðing ella niðurrindan av skuld, eigur tað almenna tí í nógvum førum at sleppa sær burtur úr sínum ognarparti í vinnuligum fyritøkum. Serliga almenni ognarparturin innan fiskavirking eigur at verða privatiseraður sum skjótast. Henda vinnan er á einum vegamóti, har týdningarmiklar strategiskar avgerðir skulu takast komandi árini. Tað er sera umráðandi, at hesar avgerðir ikki verða ávirkaðar av politiskum sjónarmiðum, men einans verða tiknar á vinnuligum grundarlag.

Privatiseringar av fyritøkum á heimamarknaðinum eiga at vera væl umhugsaðar. Aðrastaðir hevur avleiðingin av privatiseringum ofta verið, at politiskt spill og kradding av tilfeingi er vorðið avloyst av spilli og kradding av tilfeingi av privatum aktørum. Tað er vorðið alsamt meira klárt, at eisini í sambandi við væleydnaða privatisering av heimamarknaðarfyritøkum eru kapping og kappingareftirlit altavgerandi fyri, at tilfeingi verður brúkt meira samfelagsliga effektivt aftan á privatiseringina enn áðrenn. Sæð frá samfelagsligum sjónarhorni, har meiningin við privatiseringum er tilboð um betri og bíligari vørur og tænastur til føroyska brúkaran, er lítil meining í at leggja nógva orku í at útskifta eitt alment monopol við eitt privat monopol.

## Góður gróðrarbotnur til búskaparvøkstur

Búskaparráðið hevur ikki við hesum riti viðgjørt øll mál, sum kunnu seta størri ferð á búskaparvøksturin, men hevur lagt dent á marknaðarviðurskifti og neyðug politisk tiltøk til at betra handfaringina av vinnumálum í verki.

Eftir okkara tykki er møguligt at fáa meira burtur úr tøka tilfeinginum, so at vit betri megna at fylgja við tí búskaparliga framburði, sum grør uttan um okkum. Evnunum at handfara vinnuliga tøkni bilar einki og samfelagsbygnaðarliga eru vit ikki illa fyri. Tí eru góð gróðrarlíkindi til at taka ímóti broytingum í búskaparpolitikkinum sum heild og serstakliga vinnupolitikkinum, so at rúmari ræsur verða givnar til at fáa gagn av øktum produktiviteti.

Men samanrenningin av almenna politikkinum og áhugamálunum hjá seráhugabólkum eru mest óhepnu viðurskiftununi í føroyskum samfelagsbúskapi. Ongin ivi kann vera um, at hetta var avgerandi bygnaðarliga orsøkin til ovuríløgurnar í áttatiárunum og djúpu kreppuna í nítiárunum. Eins ivaleys eru vit í, at hetta er bygnaðarliga meginorsøkin til, at føroyska vælferðin er minni, enn hon er í grannalondunum.

# Litteraturlisti

Acemoglu, Daron, Simon Johnson og James Robinson. "Institutions as the fundamental cause of long-run growth" *NBER Working Paper* no. 10481

Asato, Michael S. 2002. "Corporate Governance, Adaptive Efficiency and Open Society"

Boschini, Anne D., Jan Pettersson og Jesper Roine. 2003. "Resource curse or not: A question of appropriability"

Castanheira, Micael og Hadi Salehi Esfahani. 2001. "Political Economy of Growth: Lessons Learned and Challenges Ahead"

Dixit, Avinash K. 1996. *The Making of Economic Policy: A Transaction-Cost Politics Perspective*. Cambridge, MA: The MIT Press

Dixit, Avinash K. 2003. "Some Lessons from Transaction-Cost Politics for Less-Developed Countries". *Economics and Politics*, vol. 15

Gylfason, Thorvaldur. 2000. "Resources, Agriculture, and Economic Growth in Transition".

Gylfason, Thorvaldur. 2000. "Growing Apart".

Gylfason, Thorvaldur. 2001. "Nature, Power and Growth"

Hagstofa Íslands. 2002. *Landshagir 2002*. Reykjavík: Hagstofa Íslands

Hall, Robert E. og Charles I. Jones. 1999. "Why Do Some Countires Produce So Much More Output Per Worker Than Others?". *Quarterly Journal of Economics*, vol. 114

Hibbs, Douglas A. 2001. "The Politicization of Growth Theory". *Kyklos, vol. 54*

Jones, Charles I. 2002. *Introduction to Economic Growth, second edition*. New York: W.W. Norton and Company

Jurajda, Stepan og Janet Mitchell. 2001. "Markets and Growth"

Lucas, Robert E. 1988. "On the mechanics of economic development". *Journal of Monetary Economics*, vol. 22

Mankiw, Gregory N., David Romer og David N. Weil. 1992. "A contribution to the empirics of economic growth". *Quarterly Journal of Economics*, vol. 107

Mehlum, Halvor, Karl Moene og Ragnar Torvik. 2002. "Institutions and the resource curse". *Memorandum no. 29/2002 Department of Economics, University of Oslo*

Murshed, S. Mansoob. 2001. "Transaction Cost Politics, Institutions for Commitment and Rent Seeking" *WIDER Discussion Paper no. 2001/125*

Nolsøe, Páll J. 1962. *Føroya Siglingarsøga I*. Tórshavn: Egið Forlag

Nolsøe, Páll J. 1963. *Føroya Siglingarsøga II, Bind I*. Tórshavn: Egið Forlag

North, Douglass C. 1990. *Institutions, Institutional Change and Economic Performance*. Cambridge: Cambridge University Press

North, Douglass C. 1993. "The New Institutional Economics and Development"

Parente, Stephen L. og Edward C. Prescott. 2000. *Barriers to Riches*. Cambridge, MA: The MIT Press

Patursson, Erlendur. 1981. *Fiskivinna og Fiskivinnumál 1940-1970, 3. bind.* Tórshavn: Føroya Fiskimannafelag.

Rodrik, Dani. 1999. "Institutions for high-quality growth: what they are and how to aquire them" *NBER Working Paper* no. 7540

Romer, Paul M. 1990. "Endogenous technological change". *Journal of Political Economy*, vol. 98

Sachs, Jeffrey og Andrew Warner. 1995. "Natural resource abundance and economic growth" *NBER Working Paper* no. 5398

Solow, Robert M. 1956. "A contribution to the theory of economic growth". *Quarterly Journal of Economics*, vol. 70

Swedberg, Richard. 2003. *Principles of Economic Sociology*. Princeton: Princeton University Press

The World Economic Forum. 2003. *Global Competitiveness Report 2002-2003*. Oxford: Oxford University Press

The World Bank. 2002. *World Development Report: Building Institutions for Markets*. Oxford: Oxford University Press

Trigilia, Carlo. 2002. *Economic Sociology: State, Market, and Society in Modern Capitalism*. Oxford: Blackwell Publishing